FISKIMÁLARÁÐIÐ

10. september 2010
Mál.: 200900314 / 14

Viðgjørt: RFG/KM

Uppskot

til

løgtingslóg um tilbúgving

(tilbúgvingarlógin)

Kap. 1. Virkisøki

§ 1. Tilbúgvingin skal fyribyrgja, avmarka og bøta um skaða á fólk, fæ, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðahendingar og vanlukkur, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum og skal tryggja, at virkisføri í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar orsakað av skaðahendingum ella vanlukkum.

Kap. 2. Landstilbúgvingin

Virkisøki

§ 2. Hvør landsstýrismaður skal fyri sítt ábyrgdarøki hava eina dygga tilbúgving, umframt tryggja, at virkisføri í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar orsakað av skaðahendingum og vanlukkum.

§ 3. Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum stjórnar og samskipar tilrættisleggingina av tilbúgvingini sbrt. § 2.
Stk. 2. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins útinnir, vegna landsstýrismannin, uppgávurnar eftir stk. 1 og veitir myndugleikum, kommunum og fyritøkum ráðgeving.

Umsitingarráðið

§ 4. Skipað verður eitt umsitingarráð, sum skal virka fyri, at tilbúgvingin fyri alt landið hevur nøktandi sømdir.
Stk. 2. Umsitingarráðið er mannað av løgmansstjóranum og aðalstjórunum úr stjórnarráðunum. Aðalstjórin í ráðnum, sum umsitur tilbúgvingar- og brunamál er formaður.
Stk. 3. Umsitingarráðið hevur fund minst eina ferð um árið.

Tilbúgvingarráðið

§ 5. Skipað verður eitt tilbúgvingarráð, sum skal ráðgeva í øllum tilbúgvingarligum spurningum.
Stk. 2. Tilbúgvingarráðið er mannað av stjóranum í Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, landslæknanum, landsdjóralæknanum, einum umboði fyri umhvørvi, einum umboði fyri tilbúgving á sjónum, tveimum umboðum fyri kommunurnar og einum umboði fyri Føroya

Landfúta. Umboð fyri aðrar partar kunnu manna ráðið, tá tørvur er á tí. Stjórin í Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins er formaður.
Stk. 3. Tilbúgvingarráðið hevur fund eftir tørvi og minst eina ferð um árið.

Kunngerðarheimild

§ 6. Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum kann við kunngerð áseta reglur um

1. innihald, støddd og vav á kommunalu átakstilbúgvingini,
2. útbúgving av átaksmanning og um, hvussu útreiðslur verða býttar millum land og kommunu,
3. stuðul til bjargingarfeløg og aðrar sjálvbodnar felagsskapir.

Kap. 3. Kommunala tilbúgvingin

Virkisøki

§ 7. Kommunala tilbúgvingin skal við fyriliti til váðan í kommununi vera før fyri at veita dygga hjálp móti skaða á fólk, fæ, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðahendingar og vanlukkur.
Stk. 2. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann loyva, at kommunur heilt ella fyri ein part eru felags um kommunala átakstilbúgving.

§ 8. Tá tað er neyðugt, orsakað av støddd ella vavi á skaðahending ella vanlukku, skal kommunal átakstilbúgving veita hjálp til aðra kommunala átakstilbúgving, uttan so, at tørvur er á manning og amboðum aðrastaðni samstundis.
Stk. 2. Um so er, at eingin avtala er gjørd frammanundan um endurgjald, skulu tær beinleiðis útreiðslur, ið standast av at veita hjálp, verða endurgoldnar av teirri kommunu, sum hevur biðið um hjálpina. Ósemjur um endurgjald verða avgjørdar av landsstýrismanninum í tilbúgvingar- og brunamálum.

§ 9. Landstilbúgvingin skal veita kommunalu átakstilbúgvingini víðkaða hjálp, tá tað er neyðugt orsakað av slagi, støddd ella vavi á skaðahending ella vanlukku.
Stk. 2. Tilkalling eftir hjálp sbrt. stk. 1 skal ganga um skipan, sum landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum ger reglur fyri.
Stk. 3. Kommunal átakstilbúgving skal, fyri landstilbúgvingina, veita hjálp til aðra kommunala átakstilbúgving, tá Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins krevur tað. Tær beinleiðis útreiðslur, ið standast av at veita hjálpina, verða endurgoldnar av landinum.
Stk. 4. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann um neyðugt áleggja kommunum at hava útgerð hjá landstilbúgvingini á goymslu.

Skipan av tilbúgvingini í kommununum

§ 10. Kommunustýrið stendur fyri tilbúgvingini í kommununi.
Stk. 2. Kommunustýrið skal seta eina tilbúgvingar- og brunanevnd til beinleiðis fyrisiting av kommunalu tilbúgvingini.
Stk. 3. Í tilbúgvingar- og brunanevndini sita 3 limir, tilnevndir av kommunustýrinum, átaksleiðarin og ein limur, sum fútin tilnevnir.
Stk. 4. Kommunustýrið velur formannin í tilbúgvingar- og brunanevndini. Formaðurin og í minsta lagi 1 av teimum limum, sum kommunustýrið hevur tilnevnt, skulu vera limir í kommunustýrinum.
Stk. 5. Kommunur, sum eru felags um kommunalu átakstilbúgvingina, kunnu avtala at hava felags tilbúgvingar- og brunanevnd við í minsta lagi 3 kommunalum limum og í minsta lagi einum frá hvørjari kommunu.

Tilbúgvingar- og brunasamtyktir

§ 11. Kommunustýrið skal gera eina tilbúgvingar- og brunasamtykt, sum skal fevna um:

1. Skipan og hjálparveiting hjá kommunalu átakstilbúgvingini,

2. útgerð, ið skal vera til, og hildin fyri rokning kommununar,
3. vatnveiting, ið er neyðug til eldsløkking,
4. fráboðanar- og tilkallingarhátti eftir átakstilbúgvingini,
5. uppmøtingartíð hjá átakstilbúgvingini,
6. yvirlit yvir útgerð, sum fyritøkur og virksemi í kommununi skulu hava og umsita,
7. venjing, samstarv o.a. við virkir, sum hava egintilbúgving.

Stk. 2. Tilbúgvingar- og brunasamtyktin skal samtykkjast á fundi í kommunustýrinum.
Stk. 3. Tilbúgvingar- og brunasamtyktin skal góðkennast av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins.
Stk. 4. Tilbúgvingar- og brunasamtyktin skal endurskoðast, tá tørvur er fyri tí og í minsta lagi 5. hvørt ár.

Manning o.a. í kommunalu átakstilbúgvingini

§ 12. Í hvørjari kommunu setir kommunustýrið ein átaksleiðara. Fleiri kommunur kunnu vera saman um ein átaksleiðara. Tilnevningin skal góðkennast av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins.
Stk. 2. Kommunustýrið skal seta eitt ella fleiri varafólk at vera átaksleiðaranum til hjálpar.
Stk. 3. Átaksleiðarin hevur ta útinnandi fyrisitingina av átakstilbúgvingini í kommununi.

§ 13. Kommunustýrið ásetir gjøllari reglur um setan av manning til kommunalu átakstilbúgvingina.

§ 14. Í hvørjari kommunu skal vera ein tilkallingarætlan til at boða átakstilbúgvingini frá. Tilbúgvingar- og brunanevndin ger tilkallingarætlanina. Ætlanin skal góðkennast av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins og fútanum.

Vatnveiting

§ 15. Kommunustýrið hevur skyldu at síggja til, at í hvørjum parti av kommununi við búsetingum, virkjum, virksemi o.ø. er nóg góð vatnveiting til eldsløkkingar, og at neyðturviligir koyrivegir eru í økinum.
Stk. 2. Kommunan ber útreiðslurnar av at seta upp, umsita og halda vatntøkustøð.

Eftirlit o.a.

§ 16. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins hevur eftirlit við kommunalu tilbúgvingini.

§ 17. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann áseta reglur um
1. kommunalar átaksleiðarar og hjálparar,
2. venjingar hjá kommunalu átakstilbúgvingini,
3. at nýta einsháttað sløg av útgerð, seta dygdarkrøv til útgerð og minstukrøv til manningarútgerð, verjubúnar o.a. og
4. opin vatntøkustøð.

§ 18. Um ein kommuna ikki útvegar og røkir tey neyðugu bjargingar- og sløkkiamboðini, ella ikki setir ta manning, ið neyðug er, ella um hon ikki hevur umsorgan fyri tørvandi vatnveiting ella uppmøtingarætlan, kann spurningurin verða lagdur fyri landsstýrismannin í tilbúgvingar- og brunamálum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum kann fyri kommununar rokning bøta um tað, sum vantar.

Kap. 4. Fyritøkur

§ 19. Viðkomandi landsstýrismaður kann áleggja almennum og privatum fyritøkum og stovnum at hava neyðuga egintilbúgving. Útreiðslurnar fyri at hýsa og hava útgerð og eginskipan ber tann, sum verður álagdur at hava egintilbúgving.
Stk. 2. Fyritøkur, sum hava egintilbúgving, hava skyldu til, eftir umbøn, at hjálpa kommunalu tilbúgvingini og landstilbúgvingini. Virkir, sum veita hjálp,

hava rætt til endurgjald frá tí, sum biður um hjálpina eftir vanligum reglum.
Stk. 3. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins hevur eftirlit við egintilbúgvingini hjá virkjum.

§ 20. Verður mett neyðugt at halda samfelagnum á neyðugum tilbúgvingarligum støði, kann viðkomandi landsstýrismaður áleggja almennum og privatum fyritøkum og stovnum at skipa fyri serstøkum tiltøkum við atliti at vørum, tænastum, framleiðslugøgnum o.ø., sum er partur av vanliga virksemi teirra.
Stk. 2. Hava kravboð eftir stk. 1 við sær fíggjarligt tap fyri eina fyritøku ella stovn, skal landið rinda endurgjald eftir vanligum reglum. Endurgjald kann ikki krevjast, um kostnaðurin, sum er tengdur at fremjingini av kravboðunum, kann verða fíggjaður við ásetan av prísi fyri viðkomandi vøru ella tænastu. Viðkomandi fyritøka ella stovnur skal ikki við hesum vera verri fyri enn onnur í somu vinnugrein.

Kap. 5. Bjargingarfeløg og onnur sjálvboðin

§ 21. Hvør landsstýrismaður ásetur fyri sítt ábyrgdarøki hvørjar uppgávur bjargingarfeløgini og onnur sjálvboðin kunnu røkja í tilbúgvingini.
Stk. 2. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins samskipar samstarvið millum bjargingarfeløgini og ábyrgdarpartarnar í tilbúgvingini.

Kap. 6. Átaksleiðsla og heimildir hjá átakstilbúgvingini

§ 22. Kommunali átaksleiðarin ella, tá ið hann er burtur, varafólk hansara, hevur ræðið á innara skaðastaði á landi, á vøtnum og í havnum.

§ 23. Samlaða átakið á landi, á vøtnum og í havnum verður annars samskipað av løgregluni sbrt. § 108 í rættargangslógini.

§ 24. MRCC samskipar samlaða átakið á sjónum.

§ 25. Tann, ið ræðið hevur á innara skaðastaðnum sbrt. § 22 skal, tá tað verður mett neyðugt, senda boð eftir hjálp frá aðrari kommunalari átakstilbúgving, og um neyðugt senda boð eftir hjálp frá landstilbúgvingini. Løgreglan kann aftaná samráðing við tann, ið hevur ræðið á innara skaðastaðnum, og kommunala átaksleiðaran, somuleiðis senda boð eftir hjálp.

§ 26. Tann, ið ræðið hevur á innara skaðastaðnum kann krevja, at privat útgerð og flutningstól verða latin til nýtslu í átakinum.
Stk. 2. Tann, sum sbrt. stk. 1 hevur latið útgerð ella flutningstól til nýtslu í átakinum, eigur rætt til endurgjald frá kommununi fyri at vera uttan útgerðina og flutningstól, og fyri skaða, hesi hava fingið í arbeiðinum.

§ 27. Kommunala átakstilbúgvingin hevur í sambandi við átøk, uttan rættarúrskurð, rætt til at sleppa sær inn á privata ogn, um neyðugt við at bróta niður og taka burtur forðingar.
Stk. 2. Eisini hevur kommunala átakstilbúgvingin rætt til at taka niður bygningar ella taka burtur gróður, tá ið tann, ið ræðið hevur á innara skaðastaðnum heldur tað vera neyðugt til at steðga skaðanum.
Stk. 3. Skaði, sum er íkomin av kommunalu átakstilbúgvingini í sambandi við eldsløkking, verður roknaður sum eldskaði.

§ 28. Tá eldur er í, ella óhapp stendst av vandamiklum evnum, hevur kommunala átakstilbúgvingin rætt til at nýta ta orku, sum er í brunnum, vatnleiðingum og øðrum. Samsýning kann ikki verða kravd fyri tað vatn, sum kommunala tilbúgvingin brúkar.

§ 29. Átakstilbúgvingin skal geva sær far um, hví skaði ella vanlukka er íkomin. Verður okkurt illgrunavert funnið, skal beinanvegin boðast løgregluni frá, og um til ber, skulu prógv fyri hesum varðveitast.
Stk. 2. Í sambandi við fráboðan um skaða ella vanlukku skal Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins hava boð samstundis sum átakstilbúgvingin, til tess at kunna fara

á skaðastaðið beinanvegin at gera kanningar, sum kunnu lýsa og skráseta hendingar.

Kap. 7. Boð o.a.

§ 30. Hvør tann, ið verður varugur við eldsbruna ella umstøður, ið vísa, at hóttandi vandi er fyri eldsbruna, ella varnast við óhapp av vandamiklum evnum, skal alt fyri eitt siga teimum frá, sum eru hótt av vanda, senda boð eftir kommunalu átakstilbúgvingini og royna at byrgja fyri vandanum.

§ 31. Øll hava skyldu at veita ta hjálp, tey kunnu, tá eldur er í.
Stk. 2. Tann, ið er hjástaddur, tá eldur er í, skal, tá ið tann, sum ræðið hevur á innara skaðastaðnum krevur tað, taka lut í bjargingar- og sløkkiarbeiðinum.
Stk. 3. Tann, sum sbrt. stk. 1 og 2 hevur verið uppi í bjargingar- og sløkkiarbeiðinum, hevur rætt til endurgjald frá kommununi fyri mista arbeiðsinntøku, sum prógv verður veitt fyri.

§ 32. Øll hava skyldu at gera eftir boðum frá átakstilbúgvingini.
Stk. 2. Øll hava skyldu til at virða byrging í sambandi við eitt átak og at lýða boðum frá løgregluni ella átakstilbúgvingini um at fara av avbyrgda økinum, ella vegum til og frá skaðastaðnum.
Stk. 3. Øll hava skyldu til eftir boðum um burturflyting at fara av skaðaraktum øki ella tilhaldi, og fara eftir ávístu leið til annað tilhalds- ella hýsingarøki.

§ 33. Øll hava skyldu til, eftir umbøn frá Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, at hýsa burturfluttum og í neyðugan mun at kostarhalda teimum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum ásetur tað endurgjald, sum kann latast fyri at hýsa og kostarhalda burturfluttum.
§ 34. Viðkomandi landsstýrismaður kann áleggja øllum skyldu til at geva upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at leggja til rættis tilbúgvingina.

§ 35. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann frá øllum krevja upplýsingar um, hvørji tilbúgvingarlig tiltøk eru sett í verk, ella ætlanir eru um at seta í verk, umframt upplýsingar, sum verða mettar neyðugar til at fremja uppgávurnar í tilbúgvingini.

Kap. 8. Fyribyrging o.a.

Fyriskipanir

§ 36. Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum kann áseta reglur fyri nýtslu av eldi og ljósi, fyri goymslu, flutningi og nýtslu av eldfimum ella spreingikvæmum føstum ella flótandi loftbornum evnum, og fyri innrætting og rakstri av virkjum, har slík evni verða goymd ella framleidd, fyri innrætting og nýtslu av eldstøðum og øðrum útbúnað til hita, ljós og kraft og annars gera slíkar ásetingar fyri mannaverk, so sum bygningar, tilhaldsstøð, serlig løgu- og byggiarbeiði, tangar, bingjur, kranar, tunlar, áskoðarapallar og -øki, o.a., sum verður hildið neyðugt til at byrgja fyri eldvanda, og til tryggingar av fullgóðum rakstri viðvíkjandi fráboðanar- og sløkkiútgerð, og rýmingar- bjargingar- og sløkkingarmøguleikum, um eldur kemur í.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í tilbúgvingar- og brunamálum kann áseta reglur um dygdarkrøv til byggitilfar og um at góðkenna sløkkiútgerð, sløkki- og ávaringarskipanir, og áseta reglur fyri útgerð, uppseting, viðlíkahaldi og fyri innleggjarar viðvíkjandi sløkki-, ávaringar-, eldforðingarskipanum, gassupphitingarútbúnaði v.m.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann kunngera reglur og fyriskipanir viðvíkjandi teimum viðurskiftum, sum eru umrødd í stk. 1 og 2, við tilvísing til heiti, nummar og dagfesting fyri, nær tær eru undirritaðar av skikkaðum myndugleikum.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at kommunustýri taka avgerð eftir teimum reglum, sum verða gjørdar sambært stk. 1-3.

Eldhættislig virkir o.a.

§ 37. Til at seta á stovn virksemi, har ið verða goymd, framleidd, viðgjørd, handfarin ella nýtt spreingifimir, eldkvæmir ella eldførir løgir, luftevni ella onnur vandaevni, krevst loyvi frá Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins. Sama er, tá ið tað snýr seg um umbyggingar, umvælingar, økingar, niðurtøku ella broytingar í rakstrinum.
Stk. 2. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann krevja, at slíkar avgerðir verða settar í verk viðvíkjandi staðseting, rakstri, flutningi, eftirliti, innrætting og nýtslu av goymslum og virkjum, sum hildið verður neyðugt, til tess at minka um vandan fyri eldsbruna ella spreinging, ella til at tryggja góðar møguleikar fyri sløkkiarbeiði og bjarging av mannalívum, um eldur er í, ella um óhapp stendst av vandamiklum evnum. Í hesum sambandi kann umframt verða álagt virkinum at útvega sær ávaringar-, bruna- og bjargingarútgerð og fyribyrgingarútgerð, og at leggja vatnveiting til egna nýtslu.

§ 38. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann áseta, at í ný- og verandi bygningum og mannaverkum annars, har serligur trygdarligur vandi kann vera orsakað av eldi, vandamiklum ella dálkandi evnum ella har stór virði eru hótt av oyðing, skulu rakstrarlig og byggilig tiltøk verða gjørd til tess at minka um brunavandan, og til tryggingar av fullgóðum bjargingar- ella sløkkimøguleikum, um eldur kemur í. Slík áseting kann eisini setast fyri samkomuhús, sjónleikarhús, gistingarhús, sjúkrahús, handilsdeplar og bygningar, ið verða nýttir til dagstovna-, undirvísingar-, framsýningar- ella skemtannarendamál og yvirhøvur mannaverk, goymslur við eldførum tilfari ella størri virkir og høli, har fólk koma. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann í hesum sambandi eisini áseta treytir fyri uttan- og innandura tiltøk, áseta treytir um sundurskilingar og um fráleikar millum virksemi, um ávaringarskipan, sløkkiskipan og rakstrarviðurskifti, at sløkkiútgerð verður útvegað, vatnveiting fingin í lag, at tryggja at út slepst, og at atkomuvegir verða gjørdir til akførini hjá sløkkiliðnum, umframt stød til sløkki- og bjargingarútgerð.
Stk. 2. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann áseta, at tá ið samkomuhús, sjónleikarhús, gistingarhús o.a. verða nýtt, ella serligar framførslur eru innan ella uttandura, skal brunavaktarhald vera, sum kommunustýrið skipar fyri, og sum fyriskiparin skal gjalda fyri eftir taksti, sum kommunustýrið ásetur.

Brunasýning

§ 39. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal regluliga sýna eldhættisligar bygningar, goymslur, virki, o.a., sum koma inn undir § 37.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, í hvønn mun Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal sýna bygningar, mannaverk, virki, o.a., sum koma inn undir § 38.
Stk. 3. Kommunustýri kunnu sýna bygningar, mannaverk o.a., sum verður lagt teimum at viðgera sbrt. § 36, stk. 3.
Stk. 4. Vísir sýnið, at tað fyriliggja viðurskifti, sum kunnu elva til serligan vanda fyri brunatrygdina, kann eftirlitsmaðurin forbjóða virkseminum ella forbjóða, at bygningar ella partar av bygningi, hølum ella mannaverki verða nýtt, til bøtt er um brekið, og sýnið vísir, at hetta er gjørt á fullgóðan hátt.
Stk. 5. Hevur brekið minni uppá seg, verður skrivliga álagt at bøta um brekið innan ávísa freist.
Stk. 6. Tey sbrt. stk. 4 settu forboð og krøv skulu skjótast gjørligt skrivliga boðast eigaranum ella teimum, sum beinleiðis varða av nýtsluni.

Kap. 9. Alment

Samstarv

§ 40. Landsstýrismenn, kommunur og fyritøkur kunnu gera avtalur sínámillum, við hvønn annan og við onnur, sjálvboðin sum vinnulig, um skipan av tilbúgvingini.

§ 41. Allir partar í tilbúgvingini hava skyldu at samstarva.

Gjald

§ 42. Landsstýrismaðurin kann áseta gjald fyri málsviðgerð eftir §§ 37 og 38, og fyri eftirlit sbrt. § 19, stk. 3, og eftirlit, sum skal gerast regluliga sbrt. § 39, stk. 1 og sbrt. reglum við heimild í § 39, stk. 2.

Kæra

§ 43. Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum kann leggja kærumyndugleikan viðvíkjandi avgerðum, sum eru tiknar eftir lógini, ella eftir kunngerðum við heimild í lógini, til eina kærunevnd, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina.

Kap. 10. Revsireglur

§ 44. Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður

1) tann, sum ikki er nóg varin við eldi, ljósi, eldførispinnum, øsku, eldfimum evnum og øðrum, sum annars kann elva til eld ella ikki ansar eftir, at fólk, sum hoyra til húski hansara ella virki eru nóg varin, og
2) tann, ið sum eigari ella nýtari av elektriskum útbúnað ella øðrum ljós-, kraft- ella maskinútbúnaði, sum kann elva til eld, nýtir slíkan útbúnað, ella letur hann nýta, hóast hann ikki er í fullgóðum standi.

Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ikki á fullgóðan hátt heldur eldstaðir ella roykrør frá hesum rein ella heldur skorsteinar, eldstaðir ella roykleidningar í standi. Ábyrgdina, av ikki at halda reint, hevur tann, ið sum eigari ella brúkari nýtir tey høli, har eldstaðurin er. Ábyrgdina, av ikki at halda í standi, hevur eigarin. Sama hevur nýtarin, um hann ikki sum skjótast, aftaná at hann er vorðin kunnugur við brekið, hevur sagt eigaranum ella kommunalu tilbúgvingini frá hesum.

§ 45. Brot á § 30, § 31, stk. 1 og § 32, stk. 2 verður revsað við bót ella fongsli upp til 4 mánaðir, um ikki hægri revsing er ásett í aðrari lóggávu.
Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ikki ger eftir boðum ella forboðum sambært § 19, stk. 1 og 2, § 20, stk. 1, § 26, stk. 1, § 31, stk. 2, § 32, § 33, stk. 1, § 34, § 35, § 37, stk. 2, ella § 38, stk. 1.
Stk. 3. Á sama hátt sum eftir stk. 1 og 2 verður tann revsaður, sum uttan loyvi setur á stovn, umbyggir, umvælir, økir, tekur niður ella broytir raksturin av virksemi sbrt. § 37, stk. 1.

§ 46. Í reglum, sum eru ásettar við heimild í § 36, stk. 1–3 kunnu ásetast reglur um revsing við bót.

§ 47. Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Kap. 11. Gildiskoma

§ 48. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011.
Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a.
Stk. 3. Reglur, sum eru ásettar við heimild í løgtingslóg um eldsbruna o.a. vera verandi í gildi, til reglur, ásettar við heimild í hesi lóg, koma ístaðin.

Kap. 1 Almennar viðmerkingar

Fyri at skipa tilbúgvingina fyri Føroyar á skynsaman hátt er neyðugt yvirskipað at gera greiðari reglur á fleiri økjum. Tað er neyðugt, so greitt sum gjørligt, at staðfesta ábyrgdarbýtið millum land og kommunur. Umrøðast skal, hvussu landið skipar sína tilbúgving. Neyðugt er eisini at

taka støðu til, í hvønn mun bjargingarfeløg og fyritøkur skulu vera partur av samlaðu tilbúgvingini fyri Føroyar. Harumframt er neyðugt at geva átakseindum greiðari heimildir til at virka í einum átaki.

Løgtingslóg um eldsbruna o.a. (brunalógin), sum er verandi lógargrundarlag viðv. tilbúgving, fer úr gildi 31. desember 2010, og tí er neyðugt at skipa nýtt lógargrundarlag, sum skal virka frá 1. januar 2011.

Í sambandi við, at Føroyar yvirtóku málsøkið tilbúgving 1. januar 2007 var ein kapittul um tilbúgving settur inn í brunalógina. Endamálið við ásetingunum var at geva føroyskum myndugleikum eitt umsitingarligt heimildargrundarlag at virka eftir í sambandi við yvirtøkuna. Stundir vóru ikki til at smíða eina heildarlóg innan tilbúgvingarøkið, og tað var mett skilagott at royna eina fyribilsloysn, áðrenn endalig støða varð tikin til, hvussu lóggávan best kundi skipast frameftir.

Átakið at tilevna og samskipa eina framkomna tilbúgving er enn á byrjanarstøði. Fleiri øki hava enn ikki funnið eitt skynsamligt skap, og tí er ikki møguligt í einari nýggjari tilbúgvingarlóg at útgreina øll viðurskifti.

Tilbúgving sum slík hevur verið í hóvligari menning seinastu 15 árini, hóast tann samskipandi leikluturin fyri ein part hevur ligið á láni.

Í dag hava vit bjargingarfeløg og sløkkiliðsfeløg, stórt fólkatilfeingi, flest øll sjálvboðin, sum vóna, at tilbúgvingin sum slík verður ment frameftir undir skipaðum viðurskiftum.

Kommunalu sløkkiliðini eru væl skipað. Mett verður tó ikki, at lógargrundarlagið svarar nóg væl til allar tær uppgávur, sum kommunurnar í dag røkja. Tær uppgávur, sum brunalógin í dag leggur til kommunurnar eru fyrst og fremst uppgávur í sambandi við eldsbruna. Kommunalu sløkkiliðini veita tó eina meira almenna hjálp, eitt nú kann nevnast omanlop, skalvalop og stormskaðar.

Tað eru landsmyndugleikar, sum hava eina væl skipaða tilbúgving. Sum dømi kann nevnast heilsutilbúgvingin, herundir ambulansutænastan. Tó má ásannast, at serliga tá vit tosa um stórar vanlukkur, har fleiri myndugleikar hava tilbúgvingaruppgávur, er økið ikki nóg væl skipað.

Viðvíkjandi tilbúgving í breiðum týdningi er økið heldur tilvildarliga skipað, og tvørgangandi viðurskifti eru ikki sínámillum nóg væl kend.

Uppskotið tekur atlit at átakinum at tilevna og samskipa eina tilbúgving á byrjanarstøði.

Tí er uppskotið ikki heilt útgreinandi á økjum, har viðurskifti ikki enn hava funnið eitt skynsamligt skap.

Greinarnar í brunalógini eru fyri størsta partin førdar víðari í uppskotinum, tó at fleiri konsekvensbroytingar eru gjørdar, tí at lógin breitt skal fevna um tilbúgving og ikki bert brunaøkið. Tað eru í uppskotinum, sæð í mun til verandi brunalóg, ongar kompetansuflytingar ella broytingar mótvegis kommunum. Tilbúgvingarliga verða heimildirnar hjá kommununum tó víðkaðar nakað.

Skotið verður upp í nýggju tilbúgvingarlógini, eins og í verandi brunalóg, at staðfesta økisábyrgdina (sektoransvar). Hetta merkir, at hvør landsstýrismaður skal fyri sítt ábyrgdarøki

tryggja, at tað er ein dygg tilbúgving, og skal tryggja, at virkisføri í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar orsakað av skaðahendingum og vanlukkum.

Tað verður ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni sær at avgera, hvussu økið verður skipað, og um neyðugt at útvega fígging til ta tilbúgving, sum verður mett neyðug og nóg dygg innan fyri sítt ábyrgdarøki. Tað verður ikki mett rætt, at tilbúgvingarlógin tekur støðu til, hvussu hetta verður gjørt, tí hetta er ábyrgdin hjá einstaka landsstýrismanninum.

Lógin skal framhaldandi staðfesta, at tað er landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum, sum hevur ábyrgd av at stjórna og samskipa tilrættisleggingina av tilbúgvingini hjá landinum. Eisini skal landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum, umvegis Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, ráðgeva øllum pørtum, bæði landsmyndugleikum, kommunum, stovnum, fyritøkum, sjálvbodnum og borgarum í tilbúgvingarligum spurningum.

Umsitingarráðið, sum er mannað av aðalstjórunum, skal tryggja, at fortreytirnar eru fyri, at tilbúgvingin fyri alt landið hevur nøktandi sømdir, og at tilfeingið í samfelagnum verður nýtt sum best. Umsitingarráðið skal virka sum eitt natúrligt millumlið millum politiska myndugleikan og tilbúgvingina fyri alt landið.

Umsitingarráðið kann tryggja, at leiðslurnar í øllum ráðum eru samdar um tey tilmæli, sum verða gjørd til politiska myndugleikan um raðfestingar og serlig átøk innan tilbúgvingina. Í sambandi við stórar ella drúgvar hendingar kann umsitingarráðið eisini tryggja neyðuga samskipan og samstarv.

Ætlanin er harafturat at skipa eitt tilbúgvingarráð. Tilbúgvingarráðið skal vera mannað við fakførleikum, hvør á sínum øki. Skotið verður upp, at fastu limirnir eru stjórin á Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, landslæknin, landsdjóralæknin, 2 umboð fyri kommunurnar og eitt umboð fyri Føroya Landfúta. Síðan skulu aðrir partar, sum eru viðkomandi fyri ymisku fakligu førleikarnar í tilbúgvingarhøpi takast inn eftir tørvi. Hesi skulu hvør sær umboða og ráðgeva um tørvin á økjum, har útinnandi, fyribyrgjandi og bøtandi tiltøk v.m. eru neyðug at kunna seta í verk.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal vera tann sentrali tilbúgvingarmyndugleikin, sum skal útinna samskipanina av tilbúgvingini hjá landinum, sum skal ráðgeva øðrum pørtum, sum skal hava eftirlit við kommunalu tilbúgvingini, og sum skal hava innlit í tilbúgvingina hjá øllum pørtum í landinum. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal hava fakligan førleika á høgum støði.

Fortreytin fyri eini skynsamari tilbúgving er, at fleiri ábyrgdarhavandi øki kunnu hava og nýta somu manning og útgerð. Tað verður mett skynsamt, at uppgávur við tíðini verða fluttar til tann sentrala tilbúgvingarmyndugleikan at útinna, sum eisini hevur fakligan førleika til at ráðgeva um skipan av átøkum. Eitt nú kann Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins fáa heimild og fígging til at fyrisita og stjórna ávísa hjálp.

Kommunur
Ein nýggj tilbúgvingarlóg skal, so greitt sum gjørligt, staðfesta, hvørjar uppgávur kommunur í framtíðini skulu røkja á tilbúgvingarøkinum. Tær uppgávur, sum brunalógin leggur til kommunur, eru fyrst og fremst uppgávur í sambandi við eldsbruna. Í praksis veita kommunalu sløkkiliðini tó eisini hjálp í øðrum førum enn við eldsbruna, og staðfestir uppskotið, at kommunurnar breitt hava ábyrgd fyri tilbúgving í kommununi.

Skotið verður upp, at kommunala tilbúgvingin, við fyriliti til váðan í kommununi, skal vera før fyri at veita dygga hjálp móti skaða í kommununi. Grundarlagið fyri tí, sum kommunala tilbúgvingin skal kunna ganga á møti er m.a. vídd og skap av kommunuøkinum, slag av bygningum og virksemi, fólkamongd v.m. Vavið á kommunalu tilbúgvingini skal vera nøktandi, men skal eisini avmarkast til tað, sum kann roknast rímiligt, sæð í mun til virksemi, fólkamongd, fíggjargrundarlag o.a. Tað skal, eins og nú, vera møguligt hjá kommunum at samskipa tilbúgvingina soleiðis, at tað heilt ella lutvíst ber til at nýta sama tilfeingi.

Tilbúgving kann býtast í 3 stig. Stig 1 er tann kommunala tilbúgvingin, sum er tann primera tilbúgvingin, sum einhvør kommuna í minsta lagi skal hava.

Stig 2 er, tá skaðin er størri, og grannahjálp skal tilkallast.

Skipanin skal framhaldandi vera soleiðis, at grannakommunur skulu hjálpa hvørji aðrari í sambandi við størri skaðar. Skipanin við sløkkiliðunum virkar á hendan hátt í dag, og hetta er ein skynsom skipan, sum vert er at byggja víðari á.

Stig 3 er, tá skaðin er stórur/drúgvur, ella skaði er fleiristaðni, ella átakið krevur meiri enn kommunala tilbúgvingin og grannatilbúgving kunnu handfara við sínum tøka tilfeingi. Tá farið verður út um kommunalu basingarorkunar, roknast hetta sum tilbúgvingarstig 3.

Á stigi 3 skal landið hava eina skyldu at hjálpa kommunum. Tað verður ikki mett rímiligt, at hvør kommuna við skipaðari átakstilbúgving skal taka hædd fyri øllum hendingum ella skaðum, sum kunnu koma fyri, og sum væntandi rættiliga sjáldan koma fyri. Her eigur landið at hava ábyrgd av, at hjálp verður fingin, og av at staðfesta, hvussu lagt verður upp fyri slíkar skaðar. Mett verður, at tað í verandi støðu ikki ber til at útgreina, hvussu landið kann veita hesa hjálp. Í onkrum førum kann vera nokk at veita hjálp við fakligari ráðgeving ella einans við útgerð. Í øðrum førum kann vera neyðugt eisini at veita hjálp við manning. Eitt nú kann hugsast, at landið veitir hjálpina við at áleggja fleiri kommunalum átakstilbúgvingum at veita hjálp, ella at bjargingarfeløg verða biðin um at hjálpa. Tað kann eisini vera, at landið fyri ávís tilbúgvingarøki fer at skipa serligar átakstilbúgvingar, sum verða settar inn í sambandi við serligar skaðar ella skaðaárin. Hvussu hjálp fyri ymisku ábyrgdarøkini verður skipað er nakað, sum hvør landsstýrismaður má avgera fyri sítt ábyrgdarøki. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins hevur sum er serligan fakligan førleika at ráðgeva í einum átaki, og hugsandi er eisini, at uppgávur við tíðini verða fluttar til Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins at útinna, ella soleiðis, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins fær heimild og fígging til at stjórna ávísari hjálp.

Uppskotið staðfestir hesi 3 stigini yvirskipað. Um neyðugt, skulu útgreinandi reglur síðan gerast fyri ítøkiligu tilbúgvingarøkini av viðkomandi landsstýrismonnum. Tað verður ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni fyri sítt ábyrgdarøki at útgreina, hvussu skipanin fyri sítt øki verður handfarin.

Yvirskipaða prinsippið um, at landið skal veita hjálp á stigi 3 eigur at síggjast aftur á øllum tilbúgvingarøkjum, og soleiðis leggja støði fyri, hvat kommunur kunnu væntast at skula leggja upp fyri í síni tilbúgving.

Bjargingarfeløg
Verandi støða er, at bjargingarfeløgini við fimti árum á baki eru stovnað við tí endamáli at veita bráðhjálp. Tey eru mannað við sjálvbodnum og óløntum fólki.

Mett verður umráðandi at nýta tað tilfeingi, sum er í dag, og sum vit hava sæð virkar væl. Tí verður mett skilagott, at størri dentur verður lagdur á at nýta Bjargingarfeløgini, og ætlanin er, at landið í stóran mun skal nýta bjargingarfeløgini til ta átakstilbúgving, sum landið skal útinna.

Ætlanin er, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal hava ábyrgd av at samskipa samstarvið millum bjargingarfeløgini og landsmyndugleikarnar. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann tá í sínum tilmælum til landsstýrismannin virka fyri, at bjargingarfeløgini hava ella fáa neyðugan førleika og útgerð til at røkja uppgávurnar, sum bjargingarfeløgini kunnu røkja.

Fyritøkur
Uppskotið staðfestir eina skyldu hjá ávísum virkjum at hava eina ávísa egintilbúgving, eina sokallaða virkistilbúgving, sum eisini skal virka sum ein integreraður partur av tilbúgvingini fyri alt landið. Talan er ikki um allar fyritøkur, men tær, sum eiga ella reka váðakent virksemi.

Ætlanin er ikki, at ein kravd ella neyðug egintilbúgving hjá fyritøkum skal føra við sær, at almenna kommunala átakstilbúgvingin kann vera lakari.

Skotið verður upp, at tað er ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni fyri sítt øki at skipa viðurskifti við egintilbúgving hjá virkjum. Sostatt verður tað ikki uppgávan hjá kommununum at áleggja egintilbúgving hjá fyritøkum. Ætlandi skal vera møguligt, at virkir samvirka tilbúgvingarliga, eisini tvørtur um kommunumark.

Endamálið við virkistilbúgving er at kunna bera skjótt at, tá skaðahendingar og avleiðingar koma fyri. Virkistilbúgving skal kunna gera ein skjótan "fyrstainnsats" og avmarka skaðan, til onnur hjálp kemur fram.
Sløkkiliðið á flogvøllinum er eitt dømi um, at tilbúgving við útgerð, manning, kunnleika og skjótleika kann liggja væl hjá virkishavaranum. Virkistilbúgving er altíð undir myndugleikaeftirliti og skal sampakka við tilbúgvingina annars.

Harafturat er ætlanin, at fyritøkur kunnu áleggjast at seta serlig tiltøk í verk, sum kunnu tryggja, at virkisførið í samfelagnum ikki verður skert orsakað av skaðahendingum ella vanlukkum. Her er m.a. talan um at tryggja samfelagnum veitingar, so sum mat, vatn, heilivág v.m.

Heimildir í einum átaki
Eisini er endamálið við lógini at tryggja greiðari heimildir at virka optimalt í einum átaki.

Fyri at tilbúgvingareindir skulu kunna virka optimalt í einum átaki, er eisini neyðugt at hava greiðar ásetingar hesum viðvíkjandi. Talan er um heimildir til eitt nú at taka seg inn á privata ogn, um neyðugt at kunna nýta privata útgerð í einum átaki og um endurgjald í hesum sambandi v.m. Brunalógin hevur slíkar ásetingar, men tær taka fyrst og fremst hædd fyri einum átaki í sambandi við eldsbruna. Heimildirnar í sambandi við fleirtáttað átøk skulu tí gerast greiðari.

Ætlanin er framhaldandi, at løgreglan skal vera tann myndugleiki, sum samskipar samlað átøk á landi. Hetta ger løgreglan sbrt. § 108 í rættargangslógini.

Uppskotið staðfestir harafturat, at MRCC er tann myndugleiki, sum samskipar samlaða átakið á sjógvi. Hetta broytir ikki verandi skipan.

Ummæli:
.....

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri landið
Mett verður ikki, at tað eru stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið av sjálvum uppskotinum, tí uppskotið ikki broytir stórvegis við verandi skipan. Tó skal viðmerkjast, at dentur eigur at vera lagdur á arbeiðið at samskipa ta tilbúgving, sum landið hevur ábyrgd fyri, og at ráðgeva um ger av váðametingum og tilbúgvingarætlanum, um skipan av samvirkandi átakseindum, um útbúgving, um venjingar v.m. Hetta kemur undir íverksetandi tiltøk og krevur størri játtan til Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins.

Tað skal gerast greitt, at tilbúgvingartilgongdin er soleiðis háttað, at tað einans ber til at fara fram í smáum stigum. Alt skal sampakka við hvørt annað.

Tí eigur at vera talan um eina avmarkaða meirjáttan til sjálvt tað at samskipa bruna- og tilbúgvingartilgongdina. Umleið 1 mió. kr. eigur at vera hóskandi rásarúm til tað reint umsitingarliga innan tilbúgvingarpartin í Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins.

Konkretar verkætlanir, útgerð, manning, handfaring, frálæra, frálærutilfar, samsýningar fyri átøk o.a., eitt nú størri oljubasingarátøk, størri fólkamóttøka, ógvisliga stórt kavaavfall, har hús hokna og fólk og djór koma í vanda, er ikki íroknað hesa nevndu játtan. Hetta kemur undir útvegaraskylduna hjá tí, ið hevur ábyrgdarøkið undir sær.

Eisini verður mett, at tað hevur økta arbeiðsbyrðu við sær hjá ráðum ella landsmyndugleikunum at gera váðametingar og tilbúgvingarætlanir innan egið málsøki, og at tað eisini á onkrum øki kann vera neyðugt at skipa sertilbúgvingar, sum kunnu krevja stóra fíggjarorku. Hetta er ikki møguligt at meta um í verandi støðu, men má viðgerast, so hvørt avgerð verður tikin um skipan av økjunum.

Men her skal aftur nevnast, at tilbúgvingartilgongdin einans kann fara fram í avmáldum stigum. Uppgávan verður at meta um váða og tørv, meðan kynstrið verður at seta eina samvirkandi skynsama tilbúgving í verk, sum samfelagið megnar at hava og reka.

Fleiri myndugleikar hava longu eina skipaða tilbúgving, sum byggir á økisábyrgdina. Sum dømi kunnu nevnast sjúkrahúsverkið og ambulansutænastan, og kommunalu sløkkiliðstilbúgvingarnar.

Bjargingarfeløgini eru tøk til fleiri ymisk endamál, men í hesum sambandi eru tey ikki skipað og lívgað á ein hátt, tey hava uppiborið. Lógin skal veita sjálvbodnum feløgunum eina tryggari grund at virka út frá.

Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur
Kommunurnar koma at hava eina tilbúgvingarskyldu, sum í lógini verður breiðari orðað enn í dag. Her er tó í flestu førum talan um uppgávur, sum kommunur longu hava tikið til sín og røkja. Eisini kommunurnar mugu gera váðagreiningar og –metingar, sum skulu gerast í mun til víðkaða ábyrgarøkið. Við støði í váðametingini skal ein tilbúgvingarætlan gerast. Møguligt er, at brunasamtyktirnar skulu dagførast. Viðmerkjast skal tó enn einaferð, at kommunur frammanundan taka sær av nógv breiðari øki, enn brunalógin áleggur teimum.

Mett verður, at fíggjaravleiðingin fer at rúmast innan fyri eina avmarkaða upphædd millum 20.000 kr./ár og 100.000 kr./ár, alt eftir kommunu og virkseminum í kommunuøkinum.

Viðmerkjast skal eisini, at uppgávur og skyldur eru sum nevnt ikki greinað enn.

Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið leggur upp til, at fyritøkur, sum reka vandakent virksemi ella hava lagur ella líknandi, sum er vandakent, skulu hava eina egintilbúgving. Tað verður upp til einstøku landsstýrisfólkini at skipa hesi viðurskifti nærri bæði viðvíkjandi útgerð, viðlíkahaldi og umsiting. Uppskotið fær fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri hesar fyritøkur. Tað er tó ómøguligt at meta um hesar avleiðingar, tá hesi viðurskifti ikki eru skipað fyri øll øki, og tá tað kann vera sera ymiskt alt eftir, hvat virksemi talan er um.

Afturat egintilbúgvingini kunnu fyritøkur m.a. áleggjast at hava vøru- og tilfeingisnøgd á goymslu fyri at halda samfelagnum eitt neyðugt tilbúgvingarligt støði. Her skal tó viðmerkjast, at landið sambært uppskotinum skal endurrinda fíggjarligt tap, sum slík kravboð hava við sær.

Umhvørvisligar avleiðingar
Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

Serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki sosialar avleiðingar við sær.

Avleiðingar í mun til millumtjóða ella altjóða avtalur og reglur
Uppskotið fær ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar av millumtjóða ella altjóða avtalum ella reglum.

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
§ 1 ásetur virkisøkið hjá tilbúgvingini fyri Føroyar og svarar fyri stóran part til § 13a, stk. 2 í brunalógini.

Tilbúgvingin skal verja lív og virði, sum hava týdning fyri samfelagið í breiðari merking. Talan er um virkisøkið hjá samlaðu tilbúgvingini fyri Føroyar. Eins og í øðrum londum verður tað einstaka menniskjalívið raðfest hægst, meðan evnislig virði fáa lægstu raðfesting av tí einføldu orsøk, at hesi í flestu førum kunnu verða endurreist. Eitt mist menniskjalív, avlamni o.a. eru óbøtilig, og tað sama kann vera við fæ og umhvørvi, um eitt nú álvarsom dálking elvir til, at ávís djórasløg verða hótt ella kunnu ganga undir. Evnislig virði kunnu vanliga endurreisast so ella so, uttan tá talan kanska er um forngripir og mentanararv, sum eru gomul mannaverk, ið ikki lata seg endurgera. Innihaldsliga hevur raðfylgjan av uppreksaðu virðunum við sær, at ein og hvør tilbúgving skal taka fyrilit fyri menniskjalívum fram um hini virðini. Ætlanin við uppreksaðu raðfylgjuni er at binda raðfestingina fyri allar myndugleikar, stovnar og fyritøkur, tá støddd og vav av tilbúgvingini verður gjørd innan tey ymisku økini. Tann bundna raðfestingin skal m.a. tryggja eina javnt dygga tilbúgving um alt landið, og gera tað møguligt at samskipa tilbúgvingina tvørtur um ráðs-, stovns-, fyritøku- og landamørk.

Tað framgongur eisini av § 1, at ætlanin við ásetingini er, at tilbúgvingin bæði skal leggja upp fyri ávísum ítøkiligum vandastøðum og fyri hóttandi vandum. Tær vandastøður, sum tilbúgvingin skal fyrihalda seg til, eru bæði skaðahendingar, sum javnan kunnu koma fyri, eitt nú eldur, stormur, skriðu- og skalvalop, oljudálking og stórar vanlukkur, sum ikki koma fyri javnan. Felags fyri hesar vandastøður er, at tær kunnu koma fyri her heima ella úti í heimi. Sum dømi kann nevnast, at vera ein ella fleiri føroyingar, sum eru staddir uttanlands, raktir av skaðahending ella vanlukku, so kann tað eisini merkjast her heima. Myndugleikar og avvarðandi vilja vita, hvussu støðan er, hvussu ein kann røkka og hjálpa teimum raktu, fáa tey heim o.s.fr. Sum dømi um stórvanlukku, sum fekk tilbúgvingarligar avleiðingar fyri onnur lond enn tey beinleiðis raktu, er flóðaldan í Asiu á jólum í 2004.

Eisini skal tilbúgvingin tryggja, at virkisførið í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar orsakað av skaðahendingum ella vanlukkum. Tilbúgvingin skal tryggja, at lands- og kommunalu umsitingarnar kunnu virka, at framleiðsluevnið í landinum verður tryggjað, at samferðsla og samskiftiskervið verður tryggjað og skal tryggja allar grundleggjandi veitingar, so sum mat, vatn, heilivág v.m.

Kap. 2. Landstilbúgving

Heitið landstilbúgving sipar til alt innan tilbúgving, sum landið hevur ábyrgd av. Heitið sipar ikki til eina ávísa átakstilbúgving hjá landinum, men alt, sum landið skal gera í sambandi við tilbúgving.

Til § 2

§ 2 staðfestir økisábyrgdina (á donskum sektoransvar) fyri tilbúgvingini. Greinin svarar í stóran mun til § 13b, stk. 1 í brunalógini, tó at uppgávurnar hjá landstilbúgvingini, kommunum og fyritøkum, verða reguleraðar hvør sær í hesi lóg.

Tað er hvør landsstýrismaður sær, sum skal tryggja eina nøktandi tilbúgving fyri sítt ábyrgdarøki. Tað er ábyrgdin hjá hvørjum einstøkum landsstýrismanni at tryggja, at lóggávan teir fyrisita hevur neyðugar ásetingar á tilbúgvingarøkinum, at tilbúgvingarætlanir verða gjørdar fyri teirra øki, og at neyðug átakstilbúgving er skipað á økinum.
Aðalreglan viðvíkjandi økisábyrgdini er, at tann myndugleiki, sum í tí dagliga útinnir uppgávur, sum hava týdning fyri at halda uppi eitt vanligt tilbúgvingarstig í landinum, eisini skal útinna uppgávurnar, tá tilbúgvingarstigið fer útum tað vanliga orsakað av skaðahending ella vanlukku. Tilbúgvingarætlanir eiga at verða gjørdar, sum leggja upp fyri, at tað óvanliga eisini kann henda,

og tí eiga øll við økisábyrgd at gera slíkar fyrireikingar, so til ber at flyta seg frá einum vanligum tilbúgvingarstigi yvir í eitt hægri tilbúgvingarstig.
Tað er eisini ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni fyri sítt ábyrgdarøki at tryggja, at virkisføri í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar orsakað av skaðahendingum og vanlukkum. Tryggjast skal, at lands- og kommunalu umsitingarnar kunnu virka, framleiðsluevni í landinum skal tryggjast, samferðsla og samskiftiskervið skal tryggjast, og allar grundleggjandi veitingar, so sum matur, vatn, heilivágur v.m. Viðmerkjast kann, at sambært § 20 hevur hvør landsstýrismaður heimild til, innan fyri sítt ábyrgdarøki, at áleggja myndugleikum, stovnum og fyritøkum at skipa fyri serligum tiltøkum fyri at halda samfelagnum eitt neyðugt tilbúgvingarligt støði.

Ábyrgdin hjá landsstýrismonnum í § 2 er breitt orðað. Hendan ábyrgd fevnir um alla tilbúgving fyri alt landið. Einasta avmarking skal tí finnast í teimum uppgávum, sum lógin í §§ 7 og 8 leggur til kommunurnar. Viðmerkjast kann eisini, at hvør landsstýrismaður fyri sítt ábyrgdarøki sbrt. § 19 kann áleggja fyritøkum ella stovnum at hava eina egintilbúgving, sum ætlandi skal virka sum ein partur av samlaðu tilbúgvingini fyri alt landið. Tó liggur ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni sær at skipa viðurskiftini innan fyri sítt ábyrgdarøki.

Lógin hevur onga áseting um, hvussu landsstýrismenn skipa sína tilbúgving. Landstilbúgvingin er ikki skipað í lógini. Sambært økisábyrgdini er tað hvør landsstýrismaður sær, sum hevur ábyrgd fyri, hvussu landstilbúgvingin fyri viðkomandi øki verður skipað. Ein landsstýrismaður kann tí velja at seta á stovn eina átakstilbúgving fyri sítt øki, ella at skipa tilbúgvingina við samstarvi millum stjórnarráð, har verandi stovnar fáa útinnandi uppgávur. Tað verður tó landsstýrismaðurin við økisábyrgdini, sum hevur ábyrgdina fyri, hvussu viðkomandi tilbúgving verður skipað og fíggjað.

Ætlanin er, at landið skal taka sær av øllum tí, sum er meir enn, hvat kann væntast av kommunum at hava útgerð ella serligan førleika til. Sí §§ 7 og 8.

Reguleringin í § 2 fevnir bert um ta yvirskipaðu tilrættisleggingina av tilbúgvingini. Serlig viðurskifti á einstøku ábyrgdarøkjunum hjá landsstýrismonnunum mugu tí, um neyðugt, ásetast neyvari í lóggávu fyri viðkomandi øki.

Til § 3
Ásetingin í § 3, stk. 1 er fyriskipanarliga hornasteinurin í tilrættisleggingini av tilbúgvingini. Staðfest verður, at tað er landsstýrismaðurin í tilbúgvingar- og brunamálum, sum skal samskipa tilbúgvingina millum viðkomandi partar í føroysku tilbúgvingini. Tað er framhaldandi ætlanin, at samskipanin av tilbúgvingini verður framd í verki av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins vegna landsstýrismannin. Hetta verður greitt staðfest í stk. 2. Greinin svarar til § 13c, stk. 1 í brunalógini.

Uppgávan hjá sentrala tilbúgvingarmyndugleikanum í mun til samskipan er m.a. at seta kós og ferð á tilbúgvingarsamstarvið, so samfelagið stendur tilbúgvið, um størri vanlukkur henda. Eisini skal sentrali myndugleikin tryggja eitt einsháttað grundarlag fyri tilrættisleggingini av tilbúgvingini fyri alt landið. Neyðugt er at tryggja samsvar millum tilbúgvingarætlanir hjá øllum pørtum í tilbúgvingini. Samskipandi uppgávan fær serligan týdning, tá tilbúgvingarætlanir fevna um fleiri myndugleikar og størri vanlukkur. Ein væl eydnað samskipan kann viðvirka til, at heildarútreiðslurnar til tilbúgvingina kunnu haldast niðri.

Heimildin at samskipa ger ikki inntriv í sjálvstøðugar heimildir og uppgávur, sum føroyskir myndugleikar og ríkismyndugleikar hava ella útinna sambært galdandi lóg ella siðvenju. Sum

dømi kann nevnast, at samskipandi leikluturin hjá løgregluni á skaðastaðnum í útinnandi átøkum sambært § 108 í rættargangslógini verður varðveittur í óbroyttum líki. Tað sama ger seg galdandi fyri leiklutin, sum eitt nú kommunali átaksleiðarin hevur á eldstaðnum. Heimildin hjá landsstýrismanninum við tilbúgvingar- og brunamálum snýr seg her um fyriskipanarliga at seta út í kortið og fáa í lag eina tilbúgving, umframt at tryggja eina samskipan tvørtur um myndugleika-, stovns-, fyritøku- og landamørk. Samskipanin fevnir ikki um uppgávurnar, sum eru lagdar til kommunurnar at útinna, men sami sentrali tilbúgvingarmyndugleikin – Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins – hevur eftirlit við kommunalu tilbúgvingini sbrt. § 16 og hevur harvið eisini stórt innlit í, hvussu kommunurnar eru skipaðar, og hvønn førleika kommunurnar hava. Harumframt hevur sentrali tilbúgvingarmyndugleikin eisini um hendi samskipanina av samstarvinum millum bjargingarfeløgini og ábyrgdarpartarnar í tilbúgvingini, sum bjargingarfeløgini gera uppgávur fyri og kann við sínum tilmælum um stuðul og útbúgving v.m. tryggja, at bjargingarfeløgini hava nøktandi førleika og útgerð v.m. til at kunna gera uppgávurnar, sum myndugleikar avgera at leggja til bjargingarfeløgini, víst verður til § 21.

Harvið fær sentrali tilbúgvingarmyndugleikin eisini tað innlit, sum skal til fyri at gera tilmæli um møguligar broytingar í tilbúgvingini fyri alt landið, í lógarverki v.m.

Heimildin at samskipa, sum nevnd í stk. 1, fevnir sostatt bert um myndugleikarnar, sum sambært § 2 hava økisábyrgd. Føroyskir myndugleikar kunnu, sum kunnugt, ikki áleggja ríkismyndugleikunum skyldur í tilbúgvingini. Samskipanin mótvegis ríkismyndugleikunum, ið hava ella útinna tilbúgvingaruppgávur, kann t.d. formliga skipast við samstarvsavtalum. Royndir higartil vísa, at eitt tætt samstarv er til gagns fyri allar partar. Samskipandi heimildin hjá sentrala tilbúgvingarmyndugleikanum hevur m.a. við sær, at markamót mugu eyðmerkjast og lýsast fyri at tryggja, at tilbúgvingin kann skipast og leggjast til rættis, uttan at nakað øki dettur burturímillum.

Umframt at samskipa tilrættisleggingina av tilbúgvingini hjá landsmyndugleikunum, skal Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins ráðgeva myndugleikum, kommunum og fyritøkum í øllum tilbúgvingarspurningum.

Til § 4
Umsitingarráðið er umboð fyri tey ymsu til eina og hvørja tíð virkandi landsstýrisøkini.

Umsitingarráðið kann virka fyri, at semja er um, hvør egin og hvørjar felags tilbúgvingarligar átaksskipanir skulu vera.
Roknað verður við, at semjur verða gjørdar um átaksøki, leiðslu, tilfeingi, manning, førleika, fígging, rakstrarhátt og tílíkt, sum skal heimila einum samvirkandi felags tilbúgvingarligum virksemi.

Umsitingarráðið tekur sær í hesum sambandi ta neyðugu fakligu ráðgevingina m.a. frá Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins og frá Tilbúgvingarráðnum.

Umsitingarráðið skal tryggja, at fortreytirnar eru fyri, at tilbúgvingin fyri alt landið verður skipað sum best við atliti at nýta tilfeingið í samfelagnum sum best. Umsitingarráðið skal tryggja samstarv og samskipan av tilbúgvingini fyri alt landið og skal virka sum eitt natúrligt millumlið millum politiska myndugleikan og tilbúgvingina fyri alt landið.

Út frá frágreiðingum og tilmælum ella spurningum, sum verða tikin upp av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, ella av Tilbúgvingarráðnum, verður tryggjað, at leiðslurnar í øllum ráðum

eru samd um tey tilmæli, sum verða gjørd til politiska myndugleikan um raðfestingar og serlig átøk innan tilbúgvingina fyri alt landið.

Umsitingarráðið er millumlið millum politiska myndugleikan og tilbúgvingina. Eitt forum fyri samstarv og samskipan av tilfeinginum vit hava í landinum. Í sambandi við stórar ella drúgvar hendingar ella vanlukkur, kann Umsitingarráðið eisini tryggja neyðuga samskipan og samstarv.

Til § 5
Tilbúgvingarráðið er mannað við fakførleikum, hvør á sínum øki. Hesi skulu, hvør sær, umboða og lýsa tørvin á økjum, har útinnandi, fyribyrgjandi og bøtandi tiltøk v.m. eru neyðug at kunna seta í verk.

Koma serligar støður upp, tað veri seg vandi, hóttan um vanda, ella nýggj vitan um møguligan skaða ella skaðaárin kemur fram, skal Tilbúgvingarráðið taka inn og samstarva við aðrar partar, sum hava tørv á ella vitan um tað, sum tilbúgvingin skal gera ella hava at standa ímóti við ella at krevja, at hóskandi fyribyrging verður gjørd.

Talan kann vera um atlit at skaðabasing, vatn- luft- heilsu- dálking ella oljudálkingarvandi, tilfeingistrot o.a.

Eisini skal lýsast, hvør førleiki, útbúgving o.a. eigur at vera átaksmanningum til stuðuls til at kunna útinna og vera við at útinna størri og minni átøk.

Tilbúgvingarráðið ráðgevur í sambandi við, at støðu- og framtíðarmetingar um tilbúgving verða gjørdar og kann vera við til at gera tilmæli, sum formaðurin kann leggja fyri Umsitingarráðið.

Tað er ætlanin, at fakráðið skal mannast av fólki, sum hava fakligt innlit umboðandi ymisku tilbúgvingarøkini. Ætlanin er ikki, at tað skal vera umboð fyri ymisku stjórnarráðini, men heldur umboð fyri teir myndugleikar ella stovnar v.m., sum umsita viðkomandi øki. Hetta fyri at tryggja fakliga vitan, vitan um umsiting av økinum, vitan um tilfeingi, herundir manning og útgerð v.m.

Stjórin í Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins er formaður.
Til samanberingar kann viðmerkjast, at eitt ráðgevandi brunaráð var skipað í § 1, stk. 4 í brunalógini. Brunaráðið hevði 5 limir, harav 2 limir vóru valdir av kommunum og eitt eftir uppskoti frá løgregluni.

Til § 6
Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum fær heimild til at gera reglur á 3 økjum.

Nr. 1. Innihald, støddd og vav á kommunalu átakstilbúgvingini.

Ætlanin er at gera minstureglur fyri tí, sum kommunala tilbúgvingin skal fevna um, og hvør manning, førleiki og útgerð skal vera tøk at tilkalla brádliga. Víst verður til § 7, sum ásetur, at kommunur skulu vera førar fyri at veita dygga hjálp móti skaða á fólk, fæ, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðahendingar og vanlukkur.
Vavið á kommunalu tilbúgvingini skal vera nøktandi, men eisini avmarkað til tað, sum kann roknast rímiligt, sæð í mun til fólkatal, fíggjarførleika o.a.

Talan er sostatt um at gera reglur fyri minstukrøvum, sum kommunala tilbúgvingin skal kunna røkka. Annars verður tað upp til kommununa at áseta neyvt vavið og at skipa kommunalu átakstilbúgvingina.

Viðmerkjast kann, at Brunaumsjón landsins hevur gjørt eitt rundskriv sum útgreinar, hvørja útgerð kommunalu sløkkiliðini hava sbrt. § 3 í brunalógini. Her eru ásetingar gjørdar, sum taka støði í fólkatalinum í sløkkiøkinum.

Við hesum uppskoti verður heimildin løgd til landsstýrismannin í tilbúgvingar- og brunamálum at gera reglur um innihald, stødd og vav á kommunalu tilbúgvingini. Ætlanin er, at ásetingarnar í rundskrivinum verða dagførdar og skrivaðar í kunngerð.

Nr. 2. Útbúgving av átaksmanning og um, hvussu útreiðslur verða býttar millum land og kommunu.

Sambært galdandi § 8 í brunalógini kunnu reglur ásetast um útbúgving av starvsfólkinum í sløkkiliðnum. Ásetingin verður nú orðað breiðari, soleiðis at hon eisini fevnir meira alment um tilbúgving, ikki bert sløkkiliðsmanning. Viðmerkjast kann, at kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsfólki er sett í gildi við heimild í § 8 í brunalógini. Í tilbúgvingarligum sambandi er ætlanin, at manningar, einamest leiðarar, skulu taka eina útbúgving, sum ikki einans fevnir um kommunalu sløkkiskylduna, men eisini tilbúgving generelt. Rúm verður fyri, at landið stovnsetur ein tilbúgvingarskúla.

Sambært verandi orðing skulu kommunurnar bera útreiðslurnar av útbúgving av sløkkiliðnum. Tað er tó landið, sum eigur og rekur brandskúlan, og kommunur verða ikki kravdar eftir peningi fyri sjálva útbúgvingina av sløkkiliðsfólki. Ætlanin er ikki at broyta hesi viðurskifti.

Nr. 3. Stuðul til bjargingarfeløg og aðrar sjálvbodnar felagsskapir.

Avtala kann gerast við skipaðan felagsskap um at veita hjálp, og í hvønn mun manning og útgerð skal kunna veita bráðhjálp og drúgva hjálp. Eitt nú fyri at landið kann lyfta sína skyldu at veita kommunum víðkaða hjálp, tá tað er neyðugt orsakað av slagi, stødd ella vavi á skaðahending ella vanlukku sbrt. § 9 í uppskotinum.
Umráðandi er at lýsa, hvør skal gera hvat, og at greina uppgávur, sum kunnu latast upp í hendurnar á sjálvbodnum felagsskapum at útinna.

Ynskiligt er, at allir myndugleikar við tilbúgvingarábyrgd gera upp, hvat teir ynskja at brúka sjálvbodnar felagsskapir til, so at hesir miðvíst kunnu arbeiða seg upp til at kunna røkja lýstu uppgávurnar á forsvarligan hátt. Ætlanin er, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal vera tann myndugleiki, sum samskipar samstarvið millum bjargingarfeløgini og landsmyndugleikarnar, hetta verður ásett í § 21. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins sum er tann sentrali tilbúgvingarmyndugleikin, sum bæði ráðgevur og samskipar, skal altíð vera kunnaður um, hvørjar førleikar tey sjálvbodnu hava, hvørja útgerð tey sjálvbodnu hava og harvið eisini kunna ráðgeva og gera ætlanir um, hvussu landið skal veita stuðul, herundir útbúgvingar, útgerð v.m. Persónligur førleiki, útbúnaður, útgerð og venjingar eru bert nakrar fortreytir fyri, at tey sjálvbodnu á tryggan hátt skulu kunna loysa tilbúgvingaruppgávur saman við almennu myndugleikunum.

Kap. 3. Kommunala tilbúgvingin

Tilbúgving kann býtast í 3 stig. Stig 1 er tann kommunala tilbúgvingin, sum er tann primera tilbúgvingin, sum einhvør kommuna í minsta lagi skal hava. Hendan tilbúgving er staðfest í § 7 í uppskotinum.

Stig 2 er, tá skaðin er størri, og grannahjálp skal tilkallast. Hendan tilbúgving er staðfest í § 8 í uppskotinum.
Stig 3 er, tá skaðin er stórur/drúgvur, ella skaði er fleiristaðni, ella átakið krevur meiri enn kommunala tilbúgvingin og grannatilbúgving kunnu handfara við sínum tøka tilfeingi. Tá farið verður út um kommunalu basingarorkunar, roknast hetta sum tilbúgvingarstig 3. Á tilbúgvingarstigi 3 hevur landið eina skyldu at veita víðkaða hjálp til kommunur. Hendan skyldan er staðfest í § 9.

Vísast kann eisini til almennu viðmerkingarnar viðvíkjandi teimum 3 tilbúgvingarstigunum.

Til § 7
Greinin ásetur uppgávuna hjá kommunalu tilbúgvingini. Kommunala átakstilbúgvingin er vanliga kallað sløkkiliðið. Greinin kemur í staðin fyri § 3 í brunalógini, sum ásetur skylduna hjá hvørjari kommunu at hava sløkkilið. Við uppskotinum verður orðingin gjørd almenn, soleiðis at skyldan at veita hjálp ikki bert fevnir um bjargingar- og sløkkiarbeiði, tá eldur er í ella óhapp stendst av vandamiklum evnum.

Kommunal átakstilbúgving skal í vavi, við fólki og við útgerð, vera før fyri at inna fullgott bjargingararbeiði í sambandi við skaðahendingar, sum út frá eini meting av vanliga virkseminum og støddini á kommununi kunnu koma fyri. Hendingar, sum í tí dagliga kunnu koma fyri í kommununi. Hendingar, sum vanliga kunnu koma fyri ella kunnu metast at vera ein hóttan í einstøku kommununi. Umframt til eina fyrstuhjálp í sambandi við størri vanlukkur.

Kommunala átakstilbúgvingin skal møta til ymsar fyribyrgingar- og skaðahendingar. Grundarlagið fyri tí, sum kommunala tilbúgvingin skal kunna ganga á møti er m.a. vídd og skap av kommunuøkinum, slag av bygningum og virksemi, fólkamongd og vatntøkumøguleikum.

Vavið á kommunalu tilbúgvingini skal vera nøktandi. Men henda skylda er eisini avmarkað til tað, sum kann roknast rímiligt, sæð í mun til fíggjargrundarlag o.a.

Hetta er tilbúgving á 1. stigi. Víst verður til viðmerkingarnar til kap. 3 og almennu viðmerkingarnar um tey 3 stigini.

Heimild er fyri, at gjørdar verða minstureglur fyri tí, sum kommunala tilbúgvingin skal fevna um og hvør manning, førleiki og útgerð skal vera tøk at tilkalla brádliga. Víst verður til § 6. Annars verður sum nevnt upp til kommununa at áseta neyvt vavið og at skipa kommunalu átakstilbúgvingina.

Tað eru kommunur, sum í dag eru felags um sløkkilið. Staðfest verður í stk. 2, at tað framhaldandi verður møguligt hjá kommunum at samskipa tilbúgvingina um kommunumørk, soleiðis at tað heilt ella lutvíst ber til at nýta sama tilfeingi.

Eins og í dag skal Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins geva loyvi til, at kommunur eru felags um átakstilbúgving. Ásetingar um hetta eru í dag í brunalógini § 3, stk. 2, 3 og 4.

Til § 8
Greinin staðfestir, at "Grannahjálp" skal tilkallast, tá tað er neyðugt. Hetta er sama skipan, sum er í dag. Víst verður til § 18 í brunalógini.

Hetta er tilbúgving á stigi 2. Víst verður til viðmerkingarnar til kap. 3 og almennu viðmerkingarnar um tey 3 stigini.

Stk. 2 tekur støðu til endurgjald fyri veitta hjálp. Bert beinleiðis útreiðslur, ið standast av at veita hjálpina, kunnu krevjast endurgoldnar frá kommununi, sum biður um hjálp.

Ósemjur um endurgjald kunnu leggjast fyri landsstýrismannin við tilbúgvingar- og brunamálum.

Til § 9
Landið hevur skyldu at veita kommunum víðkaða hjálp, um so er, at tað er neyðugt orsakað av, at talan er um skaða, sum er av serligum slagi, ella orsakað av stødd ella vavi á skaðahending ella vanlukku.

Hetta er tilbúgving á 3. stigi. Víst verður til viðmerkingarnar til kap. 3, umframt almennu viðmerkingarnar um tey 3 stigini.

Staðfest verður í stk. 2, at tilkalling eftir hjálp sambært stk. 1 skal ganga um skipan, sum landsstýrismaðurin letur gera. Hugsanin er, at tað altíð skal vera ein og sami landsmyndugleiki, sum skal "frígeva" hjálpina, sum landið hevur skyldu at veita, bæði fyri at tryggja samskipan av teim ymisku ábyrgdarøkjunum, og at tað eru greiðar mannagongdir fyri, nær landið veitir hjálpina.

Onki verður sagt um, hvussu hjálpin skal veitast. Hesi viðurskifti eru ikki fyri øll øki løgd í eina fasta legu. Heimild verður givin í stk. 3 til at hjálpin kann veitast við, at fleiri kommunalar átakstilbúgvingar verða settar inn.

Tað verður mett skilagott, at landið í so stóran mun sum gjørligt nýtir bjargingarfeløgini, har tað er møguligt.

Hvussu hjálpin fyri ymisku serøkini verður skipað er nakað, sum hvør landsstýrismaður má avgera fyri sítt ábyrgdarøki. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins hevur sum er serligan fakligan førleika at ráðgeva í einum átaki, og hugsandi er eisini, at uppgávur við tíðini verða fluttar til Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins at útinna, ella soleiðis, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins fær heimildirnar til at stjórna og samskipa hjálpina.

Hugsandi er eisini, at landið skipar serligar átakstilbúgvingar – staktilbúgvingar - fyri serligt slag av skaða ella skaðaárini, ella at ávísar uppgávur verða lagdar til privatar fyritøkur at útinna.

Staðfest verður í stk. 3, at kommunal átakstilbúgving hevur skyldu til at veita hjálp til aðra kommunala átakstilbúgving, um hetta verður kravt. Heimildin at krevja, at kommunalar átakstilbúgvingar verða settar inn verður løgd til Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins.

Í stk. 4 verður ásett, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann áleggja kommunum at hýsa útgerð. Hugsanin er, at tað verður gjørd ein ætlan fyri alt landið, soleiðis at neyðug útgerð til størri ella serligar hendingar er tøk. Um landið hevur høli í økinum, so kann útgerð verða løgd har, men tað kann eisini hugsast, at útgerð liggur best í hølum, sum eitt nú kommunalu sløkkiliðini ráða yvir.

Til § 10
Ásetingin umrøður skipan av tilbúgvingini í kommununi og kemur í staðin fyri § 4 í brunalógini.

Kommunustýrið hevur evstu ábyrgdina av kommunalu tilbúgvingini. Setast skal tó ein starvsnevnd, kallað Tilbúgvingar- og brunanevnd, at handfara metingar um rakstur, støði, førleika, manning, fígging o.a.
Eftir leisti, sum kommunustýrið tilvirkar, skal brunanevndin hava fyristøðuna av kommunalu tilbúgvingini.

Limirnir í nevndini umboða kommunala málsetningin og fakligar førleikar, har løgreglan og brunaumsjónarmaðurin/átaksleiðarin eru fastir limur, ið skulu umboða átaksførleika.

Formaðurin í Tilbúgvingar- og brunanevndini skal vera kommunustýrislimur ella kommunustýrisformaðurin.

Skotið verður upp, at kommunur altíð skulu hava eina tilbúgvingar- og brunanevnd. Skipanin hevur annars verið soleiðis, at landsstýrismaðurin í samráð við kommunustýrið kundi gera av, at brunanevnd skuldi setast.

Kommunur kunnu framhaldandi hava felags Tilbúgvingar- og brunanevnd, um kommunur eru felags um átakstilbúgvingina.

Kommunur, sum leggja saman Tilbúgvingar- og brunanevnd, skulu í minsta lagi hava 3 umboð úr kommunustýrinum. Minst 1 limur skal vera frá hvørjari kommunu. Kommunur, sum eru felags um brunanevnd, hava tá sama átaksleiðara/brunaumsjónarmann og fútaumboð.

Til § 11
Tilbúgvingar- og brunasamtyktir
Greinin svarar í stóran mun til § 5 í brunalógini.
Kommunustýrið skal gera neyvari reglur fyri kommunalu tilbúgvingini.

Nágreinast skal, hvat kommunala tilbúgvingin fevnir um, hvar hon húsast og, hvussu "sløkkiliðið" skal vera rikið.
Gerast skal starvslýsing fyri átaksleiðaran/brunaumsjónarmannin og vara- og hjálparfólk hansara, fíggjarætlan, útgerðar- og manningaryvirlit v.m.

Tilbúgvingar- og brunasamtykt skal gerast, so hon gongur heildarendamálinum við tilbúgvingini á møti.
Til tess at tryggja hetta og, at heildarsamsvar verður fyri alt landið, góðkennir Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins samtyktirnar.

Kommunur tilskila tey øki, sum kommunala tilbúgvingin í minsta lagi skal fevna um, og skal hetta síggjast í tilbúgvingar- og brunasamtyktini.

T.d. kann tilskilast í samtyktini, at kommunala tilbúgvingin fevnir um førleika, bjargingar- og klippiúgerð og neyðsynjarútkoyring o.a. til ferðsluskaðar á vegakervinum í kommununi og, um avtalað, eisini á grannakommunalum vegakervi.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins ger standard tilbúgvingar- og brunasamtyktir, standard setanarlýsingar, standard ábyrgdar- og starvsøkislýsingar, sum kunnu nýtast sum grundarlag fyri tílíkum skjølum.

Til § 12
Greinin svarar til § 6 í brunalógini.
Kommunustýri starvseta átaksleiðaran/brunaumsjónarmannin, og skal setanin umframt góðkennast av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins til tess at tryggja, at hesin hevur ella fer at nema sær neyðugan tilbúgvingarligan útinnandi førleika.
Átaksleiðari kann vera felags fyri fleiri kommunur, sum samvirka tilbúgvingarliga.

Átaksleiðarin hevur ræði á sløkki-, bjargingar- og basingartiltøkum, sum koma fyri í kommununi.

Undir sær hevur átaksleiðarin kommunalu tilbúgvingar- og "sløkkiliðsmanningina".

Til § 13
Greinin kemur í staðin fyri § 7 í brunalógini.

Kommunustýrið setur fólk í starv. Kommunustýrið kann lata setanir av tilbúgvingar- og sløkkiliðsmanning til tilbúgvingar- og brunanevndina.

Manningin á tilkallingarlista, har samvirkað verður, kann vera úr meir enn einari kommunu, um so er, at hetta betrar tilbúgvingina.

Til § 14
Greinin kemur í staðin fyri § 12 í brunalógini.

Kravt verður, at kommunur hava eina tilkallingarætlan. Ein tilkallingarætlan kann fevna um vanliga manningartilkalling og um uppmøting til serlig støð, virki, virksemi, bygningar o.a. Tílík ætlan til ávís støð kann heilt ella lutvíst roknast sum ein tilbúgvingarætlan hjá sjálvari kommunalu tilbúgvingini.

Ætlanin skal góðkennast av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins og av fútanum.

Til § 15
Vatnveiting
Greinin kemur í staðin fyri § 11 í brunalógini.

Staðfest verður, at kommunustýrið hevur ábyrgd fyri, at nóg góð vatnveiting er til eldsløkkingar, og at neyðugir vegir eru í økinum.

Til § 16
Eftirlit
Greinin kemur í staðin fyri § 1 í brunalógini.

Staðfest verður, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins hevur eftirlit við kommunalu tilbúgvingini.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal hava fullan kunnleika um kommunalu tilbúgvingarstøðuna, hetta til tess at kunna hava eftirlit við, um minstamark fyri einum kommunalum tilbúgvingarstøði er hildið.
Kommunala tilbúgvingin skal skipast soleiðis, at hon kann samvirka við landstilbúgvingina.

Eftirlitið fevnir um, at lógarinnar reglur verða hildnar umframt reglur, sum verða gjørdar við heimild í lógini.
Vísast kann á, at Brunaumsjón landsins sambært § 1 í galdandi brunalóg hevur eftirlit við brunamálum, og staðfest er, at eftirlitið fevnir um:

1. Tilbúgving og útgerð hjá sløkkiliðunum.
2. Gerð av brunareglugerð
3. Vatnveiting til sløkkilið
4. Ávaringarskipan hjá sløkkiliðunum
5. Útbúgving av manningini í sløkkiliðunum.

Til § 17
Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins fær heimild til at gera ávísar reglur fyri kommunalu tilbúgvingarnar. Talan er um reglur av meira tekniskum slag, sum ikki verða mettar neyðugar at seta í kunngerð.

Tilsvarandi heimildir hjá brunaumsjón landsins at gera reglur eru í dag í brunalógini § 6, stk. 4 (reglugerð fyri brunaumsjónarmenn og hjálparar), § 9 (venjingar) og § 10 (einsháttað sløg av sløkkiamboðum og -kranum og reglur fyri opin vatnveitingarstøð).

Á hesum økjum ger Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins reglur fyri minstukrøvum, sum kommunala tilbúgvingin skal kunna røkka. Tílíkar reglur verða gjørdar eftir eini heildarmeting, eisini við atliti at fólkatali, virksemi o.ø. og, hvussu grannakommuna er háttað.

Reglur verða at gera um mannagongd, ræði, samstarv, tilkalling, venjingar og útgerð til tess at viðurskifti verða sum mest einsháttað í kommunalu tilbúgvingini eins og í landstilbúgvingini. Tílíkar reglur taka atlit at fólkatali, pørtum sum átaka sær tilbúgvingarligar útinningar v.m. og skulu í heila tikið standa á fakliga haldgóðum og skynsomum fortreytum.
Reglugerð fyri brunaumsjónarmenn er gjørd við heimild í § 6, stk. 4. Reglugerðin er frá 1991. Ætlanin er at dagføra reglugerðina, men verður hon galdandi inntil nýggj er gjørd.

Til § 18
Greinin kemur í staðin fyri § 13 í brunalógini. Ongin innihaldslig broyting er gjørd.

Staðfest verður, at um kommunan ikki útvegar neyðug bjargingar- og sløkkiamboð, ikki setur neyðuga manning, ella ikki tryggjar nóg góða vatnveiting ella uppmøtingarætlan, so kann málið verða lagt fyri landsstýrismannin við tilbúgvingar- og brunamálum. Staðfest verður eisini, at landsstýrismaðurin kann fyri kommunurnar rokning bøta um tað, sum manglar.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins hevur eftirlit við kommunalu tilbúgvingini og skal um neyðugt vísa kommununi á manglar. Greinin er ongantíð nýtt, og vænta verður heldur ikki, at tað verður neyðugt at nýta hesa heimild, tá samskifti við kommunurnar verður mett at vera neyðugt.

Kap. 4. Fyritøkur

Galdandi brunalóg hevur ásetingar um fyritøkur í § 13a og § 13b, stk. 1. Ásett er, at tilbúgving eisini fevnir um tað virksemi, sum almennar og vinnuligar fyritøkur reka, og sum hevur týdning fyri tilbúgvingina, og at fyritøkur, fyri sítt ábyrgdarøki, skulu hava eina dygga tilbúgving, umframt tryggja, at virkisføri í samfelagnum minst møguligt verður skert ella fer til grundar orsakað av kreppum og vanlukkum.

Ætlanin við ásetingunum í kap. 4 í uppskotinum er at nágreina, hvønn lut fyritøkur hava í tilbúgvingini. Ætlanin er, at tað í 2 førum kann áleggjast fyritøkum at taka lut í tilbúgvingini. Fyri tað fyrsta er ætlanin, at tær fyritøkur, sum hava virksemi, ella lagur ella líknandi, sum kann gerast ein vandi fyri fólk, fæ, virðir ella ognir, skulu hava eina egintilbúgving. Talan er ikki um allar fyritøkur, bert tær, sum hava vandakent virksemi.

Harumframt verður skotið upp, at fyritøkur kunnu áleggjast at seta serlig tiltøk í verk, sum kunnu tryggja, at virkisføri í samfelagnum ikki verður skert orsakað av skaðahendingum ella vanlukkum. Her er m.a. talan um at tryggja samfelagnum veitingar, so sum mat, vatn, heilivág v.m.

Til § 19
Skotið verður upp, at skipanin fyri fyritøkur er tann, at hvør landsstýrismaður fyri sítt ábyrgdarøki kann áleggja fyritøkum, sum reka vandakent virksemi, at hava eina egintilbúgving.

Tað er ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni fyri sítt øki at skipa hesi viðurskifti nærri. Sostatt verður eisini staðfest, at tað er ikki uppgávan hjá kommunum at áleggja fyritøkum egintilbúgving v.m.

Endamálið við virkistilbúgving er at kunna bera skjótt at, tá skaðahendingar og avleiðingar koma fyri. Virkistilbúgving skal kunna gera ein skjótan "fyrstainnsats" og avmarka skaðan, til onnur hjálp kemur fram.
Virkistilbúgving er altíð undir myndugleikaeftirliti og skal sampakka við tilbúgvingina annars.

Bæði almennar og privatar fyritøkur og stovnar kunnu áleggjast at hava egintilbúgving.

Tann, sum verður álagdur at hava egintilbúgving, ber sjálvur kostnaðin av egintilbúgvingini.

Viðmerkjast kann, at á brunaøkinum er ásett í § 37 í uppskotinum, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal geva loyvi til, at eldhættislig virkir verða sett á stovn, og Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann áleggja fyritøkum at hava útgerð v.m. til eldsløkking.

Viðkomandi landsstýrismaður, til dømis ein, ið varðar av oljugoymslu, óhappi ella stórskaða í sambandi við olju- ella bensinútláti, kann áleggja fyritøku, virki ella virksemi at hava basingarútgerð, sum svarar til møguligt hendiligt óhapp, umframt manning og gjørdar mannagongdir fyri fráboðan, tilkalling og handfaring, tá ið vandi er fyri óhappi, og tá óhapp er hent.
Ein kravd ella neyðug virkistilbúgving ger ikki, at almenna kommunala ástaðartilbúgvingargrundstøðið verður lakari.

Stk. 2 staðfestir, at virkistilbúgving eftir umbøn hevur skyldu til at hjálpa kommunalu tilbúgvingini og landstilbúgvingini. Verða virkir biðin um at hjálpa, so hava tey rætt til endurgjald eftir vanligum reglum.

Stk. 3 ásetur, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal hava eftirlit við egintilbúgvingini hjá fyritøkum.

Eftirlitið skal tryggja, at virkistilbúgvingin verður gjørd, hildin og vand soleiðis, at tryggjað verður, at hon er virkin, meðan goymsla, virksemi og tiltøk eru.

Nevnast kann, at § 39 áleggur Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins at hava regluligt brunaeftirlit við virkjum, sum eru fevnd av § 37 (eldhættislig virkir). Nevnast kann, at tey virki, sum verða áløgd at hava skipan at fyribyrgja og basa oljudálking ofta eru somu virkir, sum Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal hava eftirlit við sbrt. § 39, og í teimum førum er skynsamt, at eftirlitið við virkjunum verður samskipað.

Til § 20
Fyri at halda samfelagnum eitt neyðugt tilbúgvingarligt støði, kann landsstýrismaður, sum skal hava atlit at týðandi og neyðugum vørutilfeingi til fólk og fæ, so sum, vatn, olja, matur, heilivágur, hjálpar- og basingarútgerð o.a. áleggja einum virki at hava ávísa vøru- og tilfeingisnøgd á goymslu, so ikki uppisetur kemur á innan rímiligt tíðarbil.

Ásett verður í lógini, at endurgjald ikki kann krevjast, um kostnaðurin, sum er tengdur av at fremja kravboðini, kann verða fíggjaður við ásetan av prísi fyri viðkomandi vøru ella tænastu.

Kap. 5. Bjargingarfeløg

Til § 21
Hvør landsstýrismaður sær hevur ábyrgd av, at tað undir honum er tilbúgving tøk, sum kann ganga givnum hendingum og tørvi á møti. Tí verður fyrst staðfest, at tað er hvør landsstýrismaður sær, sum fyri sítt ábyrgdarøki skal áseta, hvørjar uppgávur Bjargingarfeløgini ella onnur sjálvboðin kunnu røkja í tilbúgvingini.

Sum er, er leikluturin hjá sjálvbodnum felagsskapum í tilbúgvingini ikki væl lýstur ella greiddur. Aðalreglan hjá teimum sjálvbodnu felagsskapunum er at bjóða tænastur fram uttan kostnað. Ynskiligt er, at allir myndugleikar við tilbúgvingarábyrgd gera upp, hvat teir ynskja at brúka sjálvbodnar felagsskapir til, so at hesir miðvíst kunnu arbeiða seg upp til at kunna røkja lýstu uppgávurnar á forsvarligan hátt.

Skotið verður upp, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal vera tann myndugleiki, sum samskipar samstarvið millum bjargingarfeløgini og ábyrgdarpartarnar í tilbúgvingini. Tilbúgvingar og brunaumsjón landsins skal hava innlit í førleikar og útgerð hjá sjálvbodnum, og skal eisini kunna ráðgeva myndugleikum í, hvørjar uppgávur tey sjálvbodnu kunnu røkja. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal eisini ráðgeva og gera ætlanir um, hvussu landið skal veita stuðul til tey sjálvbodnu, herundir veita útbúgving, útvega útgerð ella líknandi.

Persónligur førleiki, útbúnaður, útgerð og venjingar eru bert nakrar fortreytir fyri, at tey sjálvbodnu á tryggan hátt kunnu loysa tilbúgvingaruppgávur saman við almennu myndugleikunum.

Kap. 6. Átaksleiðsla og heimildir hjá átakstilbúgvingini

Til § 22
Greinin kemur í staðin fyri § 17 í brunalógini og verður orðað breitt, soleiðis at ásetingin ikki bert er galdandi í sambandi við bruna.

Kommunali átaksleiðarin, ella tá honum berst frá, næst setta varafólk hansara, hevur innan sítt kommunumark ræðið á innara skaðastaðnum, hetta við atliti at skaðabasing, umhvørvis-, virðis- og fólkabjarging, sum er skylda kommununar.

Greinin er galdandi fyri skaða, sum er í eini kommunu, tað vil siga á landi, á vøtnum og í havnum. Við hesi staðfesting av økinum, sum kommunali átaksleiðarin hevur sítt virkisøki, verður eisini samsvar við ásetingarnar í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum, har tað er staðfest, at kommunur hava ábyrgd av økinum, sum er í havnum, herundir fram við bryggjum og havnarløgum, og í bátahyljum.

Innara skaðastaðið er ein tilskilan um, at eginhjálpar- og basingarskyldan er lutvíst avmarkað. Tó kann átakið vera økisliga víðfevnt og ikki eitt eygsýniligt avmarkað øki.

Kommunali átaksleiðarin hevur tá eins væl, vegna kommununa, fult ræðið mótvegis fyribyrging, bjarging, basing v.m.

Um fólkaskaði er hendur og dagliga sjúkrahústilbúgvingin við t.d. ambulansutænastuni kann handfara og hjálpa, nýtist kommunali átaksleiðarin ikki at seta tiltøk í verk.

Innara skaðastaðið er at skilja tað geografiska økið á landi ella á vágni, har átaksvirksemi fer fram, og tað økið uttanum, sum er neyðugt til tess at kunna virka forsvarliga.
Eldur í bygningi er vanliga í vídd eitt avmarkað "innara" skaðastað. Dálking, stormskaði ella eitrandi luftrák, kunnu greinast sum stórt skaðastað ella fleiri skaðastaðarøkir, sum virkað verður á.

Politiið og átaksleiðarin/brunaumsjónarmaðurin taka avgerð um, hvat er innara skaðastað, og hvar serligt vandaøki er.
Kommunali átaksleiðarin hevur skyldu til at meta um skaðahendingina, og skal seta tað í verk, sum skynsamliga er neyðugt, m.a. taka sær til hjálpar manning, útgerð, ráðgeving o.a.

Til § 23
Samlaða átakið verður samskipað av løgregluni sbrt. § 108 í rættargangslógini. Mett verður rættast, at uppgávan, sum løgreglan røkir í dag sambært rættargangslógini § 108, framhaldandi verður rikin av løgregluni. Tilbúgvingarlógin broytir sostatt ikki verandi skipan á hesum øki. Uppgávurnar hjá løgregluni kunnu ikki regulerast við løgtingslóg. Tá uppgávan hjá løgregluni sambært § 108 í rættargangslógini verður nevnd í tilbúgvingarlógini, er hetta tí bert fyri at upplýsa sum best um, hvussu tilbúgvingin verður skipað.
Til tess at fleiri átakslið kunnu samvirka skynsamt í sambandi við skaðahendingar,- t.d. ambulansa, sløkkilið, bjargingarlið, politi, onnur umbiðin hjálp, ábyrgdarhavandi myndugleikar,- samskipar løgreglan boð, almenna kunning, uppmøting, ferðslu og annað, sum kann bøta um samlaðu átaksgongdina.

Løgreglan ger m.a. tørvandi avbyrging, heldur skil á og ger øll tiltøk, sum eru neyðug fyri trygdina. Hesar uppgávur eru beinleiðis nevndar í galdandi brunalóg ,§ 20, stk. 1, og eru partur av teimum uppgávum, sum løgreglan røkir sambært § 108 í rættargangslógini.

Vanliga verður sagt, at uppgávan hjá løgregluni fevnir um hendingar á landi, á vøtnum og á firðum.

Fyri at samanfall skal vera millum samskipanina hjá løgregluni og uppgávuøkið hjá kommunalu tilbúgvingini í mun til samskipanina av tiltøkum á sjónum, verður økið nágreinað sum á landi, á vøtnum og í havnum. Hetta merkir eisini fram við bryggjum og havnarløgum, og í bátahyljum.

Til § 24
Staðfest verður, at tað er MRCC, sum samskipar tað samlaða átakið, tá talan er um hendingar á sjónum.

Talan er um mannagongd og uppgávu, sum MRCC røkir í dag. Ætlanin er sostatt ikki at gera nakra broyting hesum viðvíkjandi, tó at nú er uppgávan lógarfest.

MRCC er alarmsentralur fyri hendingar á sjónum og skal í hesum sambandi fráboða til røttu viðkomandi. Tað er tann landsstýrismaður, sum hevur økisábyrgdina, sum avgerð, hvørji hesi røttu viðkomandi eru. Tí er avgerandi, at øll øki eru skipað, og at greiðar tilbúgvingarmannagongir eru á øllum økjum.

SAR - search and rescue – í sambandi við hendingar á sjónum er økisábyrgdin hjá landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum. Hetta økið tekur MRCC sær av vegna landsstýrismannin. Viðmerkjast kann, at mannalív altíð hevur framíhjárætt í raðfestingini av uppgávunum, og er hetta eisini staðfest við, at fólk eru nevnd fyrst í § 1 í lógaruppskotinum, sí viðmerkingarnar til § 1.

MRCC tekur sær tískil av tí uppgávuni, sum hevur framíhjárætt í øllum hendingum á sjónum. Tað eru tó oftast eisini aðrar uppgávur í sambandi við eitt átak – tað kann vera sleiping, at olja lekur ella, tað er vandi fyri, at tað fer at leka, skipið skal møguliga hava lensipumpuhjálp frá landi, tað kann vera tørvur á fólkamóttøku á landi o.a. Alt hetta má íverksetast í eini skynsamari raðfylgju. MRCC tekur sær av at senda boð til røttu partarnar, soleiðis at ”rætta” hjálpin kemur fram skjótast gjørligt.

MRCC er tann parturin, sum altíð skal kenna allar tær mannagongdir, sum eru gjørdar, og skal við síni sentralu samskipandi samskiftisuppgávu tryggja, at allir viðkomandi partar verða tilkallaðir, og at responstíðin verður so stutt sum gjørligt. Greiðar mannagongdir – tilbúgvingarætlanir – eru ein fortreyt fyri, at átakið verður samskipað á besta hátt, og at responstíðirnar eru so stuttar sum gjørligt.

Ásetingin skal avmarkast í mun til ásetingina í § 23, samskipandi uppgávuna hjá løgregluni. Tað vil siga, at MRCC samskipar øll átøk, sum henda á sjónum, uttan tá hendingin fer fram við bryggjum og havnarløgum, og í bátahyljum.

Til § 25
Greinin kemur í staðin fyri § 18 í brunalógini.

Greinin staðfestir, at tað er tann, sum hevur ræðið á innara skaðastaðnum, sum hevur heimild til, vegna kommuna, at senda boð eftir hjálp. Talan er bæði um grannahjálp, sbrt. § 8, og eftir hjálp frá landinum, sbrt. § 9.

Eisini kann løgreglan, aftaná samráð við tann, sum hevur ræðið á innara skaðastaðnum, senda boð eftir hjálpini.

Til § 26
Greinin kemur ístaðin fyri § 15, stk. 3 í brunalógini.

Tann, sum hevur ræðið á innara skaðastaðnum hevur skyldu til at seta í verk neyðug tiltøk, og kann krevja at fáa ta hjálp, sum er neyðug til tess at hjálpa og basa so skjótt og nyttusamt sum

gjørligt. Tí verður staðfest, at hesin kann krevja, at privat útgerð og flutningstól verða nýtt í átakinum.
Stk. 2 hevur ásetingar um endurgjald.

Til § 27
Greinin kemur í staðin fyri § 16, stk. 1-3 í brunalógini.
Kommunala átakstilbúgvingin hevur sum fyrsta setning at bjarga fólk og fæ. Síðani skulu virði hjá fólki ella samfelagsvirði bjargast. Tryggjast skal, at brunaskaði ella dálkingarskaði o.a. ikki breiðir seg meir enn neyðugt til aðrar partar á ognini, ella til aðra ogn, goymslu, virksemi ella onnur øki.
Tí fær kommunala átakstilbúgvingin rætt til, uttan rættarúrskurð, at sleppa sær inn á privata ogn. Hetta kann eisini gerast við at taka seg inn – bróta niður og taka burtur forðingar.
Eisini fær kommunala átakstilbúgvingin sbrt. stk. 2 rætt til at taka niður bygningar, men bert, um hetta er neyðugt, fyri at steðga skaðanum.
Í §16, stk. 3 í brunalógini er ásett, at tá bygningar verða tiknir niður, skulu, um møgulig, fáast loyvi frá fútanum. Hetta var ásett, tí tað var mett, at tað at taka niður bygningar var so álvarsligt, at skotið var upp, at tað í slíkum førum, um gjørligt, skuldi fáast loyvi frá fútanum. Mett verður tó, at tað í eini støðu, tá talan er um at steðga skaða skal gerast so skjótt, at tað verður ógjørligt at fáa loyvi, áðrenn handlað verður. Tað er tekniski leiðarin, sum hevur neyðuga innlitið til at staðfesta, um tað er neyðugt fyri at steðga skaðanum at taka niður ein bygning. Hetta kann sjálvsagt bert gerast, um tað er alneyðugt.

Stk. 3 staðfestir, at skaði, sum er íkomin av, at tiltøk verða sett í verk av kommunalu átakstilbúgvingini, sum er neyðugur partur av skaðabasandi tiltakinum er at rokna sum skaði elvdur av eldsbrunanum. Hetta merkir, at eigarin av ognini kann krevja skaðan goldnan av møguligari brunatrygging. Um ongin trygging er, ella um ognin er undirtryggjað, má eigarin sjálvur rinda tapið, uttan so, at vanligu reglurnar um endurgjald kunnu føra til, at endurgjald kann krevjast frá øðrum.

Til § 28
Greinin svarar til grein 16, stk. 4 í brunalógini.
Átakstilbúgvingin fær rætt til, uttan samsýning, at nýta tað vatn, sum er.

Til § 29
Greinin svarar til § 19 í brunalógini.

Átakstilbúgvingin skal altíð geva sær far um, hví skaði er hendur og skal boða løgregluni frá, um okkurt illgrunasamt verður funnið. Eisini skal prógv verða varðveitt, um tað ber til.

Átakstilbúgvingin kann ábyrgdast fyri, at prógv ella ábendingar um eina skaðaorsøk verða burturbeind ella fjald. Bjargingar- og sløkkiarbeiðið skal, um gjørligt, fara skynsamliga fram við atliti at hesum.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal eisini tilkallast, soleiðis at tað er møguligt at gera kanningar, sum kunnu lýsa og skráseta hendingar.

Til tess at halda seg dagførdan, og at kunna tilevna reglur, geva vegleiðing, frálæru o.a., er neyðugt at hava møguleika til at fylgja ymsum skaðahendingum og átøkum.

Kanningar eftir eldsbruna og aðrar skaðahendingar er týðandi íkast til, at kunnleiki kann koma til nyttu í frálæru, málsviðgerð, dagføring av reglum v.m.

Kap. 7. Boð v.m.

Til § 30
Greinin svarar til § 14 í brunalógini.

Greinin staðfestir eina skyldu til tey, sum vera varug við eld ella hóttandi vanda fyri eldi, um beinanvegin at siga teimum frá, sum verða hótt, at senda boð eftir hjálp, og at royna at byrgja fyri vandanum.

Til § 31
Greinin svarar til § 15, stk. 1, 2 og partvíst 4.
Greinin áleggur øllum, sum eru hjástødd, tá eldur er í, ella tá vandi er fyri eldi, at veita ta hjálp tey kunnu.

Heimildin til at biðja um hjálp verður løgd til tann, sum hevur ræðið á innara skaðastaðnum, hetta er kommunali átaksleiðarin ella varafólk hjá honum.
Kommunala átaksleiðslan kann eftir hesum taka sær fólk, sum stødd eru í nánd, at hjálpa til á ymsan hátt í einum skaðabasandi ella fyribyrgjandi tiltaki.

Stk. 3 hevur ásetingar um endurgjald.

Til § 32
Greinin áleggur øllum eina skyldu at gera, sum átakstilbúgvingin gevur boð um. Hendan áseting er breið og er galdandi fyri alla átakstilbúgving. Øll hava skyldu at virða avbyrging og at fara av avbyrgda økinum.

Eisini hava øll skyldu til at gera eftir boðum um bráðflyting (evakuering) og at fara eftir ávístu leið til ávíst tilhalds- ella hýsingarøki.
Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann sjálv, ella eftir møguligum reglum fyrisettar av tilbúgvingini, vísa á, hvussu og hvar fólk og fæ kunnu bráðflytast (evakuerast) í sambandi við álvarsamar fylgjur av neyðstøðu ella eini skaðahending.

Til § 33
Greinin staðfestir eina skyldu hjá øllum at hýsa og kostarhalda fólki, sum verða bráðflutt. Tað er Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, sum kann geva boðini um at hýsa og kostarhalda fólki.

Ætlanin er, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal gera mannagongd fyri, hvussu lýsast kann í loftmiðlum um tørv og áheitan í sambandi við t.d. at vera um, hjálpa ella hýsa fólki.

Um tað gerst neyðugt at hýsa og kostarhalda bráðfluttum, so er ætlanin at áseta endurgjald, sum verður gjørt eftir føstum taksti.

Til § 34
Greinin áleggur øllum teimum, sum hava upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at leggja til rættis tilbúgvingina skyldu til at geva hesar upplýsingar.

Viðkomandi landsstýrismaður – til dømis tann, ið varðar av innlendis- og uttanríkismálum, heilsu, matvørum, tilfeingi, løgreglu, tilbúgving, flutningi, fíggjarviðurskiftum og økjum annars, sum kunnu vera tilbúgvingarliga viðkomandi, - hevur rætt til fulla kunning um viðurskifti, sum kunnu vera honum til stuðuls í hesum sambandi.

Til § 35
Fyri at fáa neyðuga innlitið og kunna ráðgeva og samskipa á nøktandi hátt, fær Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins rætt til at krevja allar upplýsingar, sum eru viðkomandi í tilbúgvingarligum spurningum. Upplýsingar kunnu krevjast frá øllum, sum hava slíkar upplýsingar, herundir privatum, eisini frá 3. parti, um hesin hevur upplýsingar, sum eru neyðugar í tilbúgvingini.

Innlitsrætturin fevnir eisini um rætt til innlit í avtalur, sum verða gjørdar sambært § 40 í uppskotinum fyri at tryggja, at gjørdar avtalur ikki eru í andsøgn við tær fyritreytir og ábyrgdir, sum avtalupartarnir sambært hesi lóg virka eftir.

Kap. 8. Fyribyrging o.a.

Fyribyrging o.a. eru reglur, sum skulu tryggja, at mannaverk, anlegg, bygningar, virkir, goymslur, umhvørvi og ymiskt virksemi í heila tikið er støðugt og trygt, og ikki meiri viðkvæmt fyri hendingum, enn samfelagið má taka á seg**.**
Kommunala tilbúgvingarstøðið kann verða ávirkað av vandamiklum virksemi, sum fer fram í kommunuøkinum. Neyðugt er at tryggja, at reglur eru fyri, bæði hvussu tað verður bygt, viðlíkahildið, umsitið, og at neyðugar heimildir eru fyri at hava eftirlit við byggingum, goymslum og virksemi.

Fyribyrgjandi parturin kann vera tann, sum hevur størstan týdning fyri, at skaðahendingar ikki koma fyri. Betri fyribyrgingin er, færri skaðahendingar koma fyri, og minni kostnaðarmikið verður tað fyri samfelagið.

Byggimálsviðgerð
Tað er í uppskotinum ikki gjørd nøkur broyting í myndugleikauppgávunum í sambandi við byggimálsviðgerð. Tað er framhaldandi Brunaumsjón landsins, nú Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, sum skal viðgera serliga bygging á brunatekniska økinum. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal viðgera alla bygging, sum kemur undir § 37 (§ 21 í brunalógini) og tann part av § 38 (§ 22 í brunalógini), sum skrivaðar reglur ikki eru fyri. Ætlandi skal nýggj kunngerð gerast við heimild í § 36 (§ 25 í brunalógini), sum greitt staðfestir, at har skrivaðar reglur eru í kunngerðini fyri brunateknisku byggimálsviðgerðini, har skulu kommunur sjálvar viðgera byggimálini, meðan í teimum førum, tá byggingin fer útum skrivaðu reglurnar í kunngerðini, tá skal Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins viðgera brunateknisku spurningarnar.

Tær atfinningar, sum eru settar móti verandi brunalóg byggja í fleiri førum á, at ábyrgdarviðurskifti millum kommunu og Brunaumsjón landsins í sambandi við byggimálsviðgerð eru ógreið.

Hetta er komið fram í sambandi við byggimálsviðgerð av serligum bygningum, virksemi, og bygningum har nógv fólk koma. Hildið hevur verið, at tað er heimildarbland, tá vanliga kommunala byggimálsumsitingin skal samstarva við serliga brunatekniska málsviðgerðareind undir landinum, sum er Brunaumsjón landsins. Víst hevur verið á, at í Danmark liggur alt hetta undir kommununum.

Í Danmark er vanlig málsviðgerð og serlig bruna- og trygdarlig málsviðgerð heilt hvør sær og lutvíst undir hvør sínum "ministaraeftirliti".

Tann føroyski leisturin er, at ein felags umsiting er fyri serliga málsviðgerð. Hendan er fyri allar kommunur og allar borgarar í landinum.

Tað vildi verið eitt afturstig at lagt serstovnin við serligari brunatrygdarligari byggimálsviðgerð undir kommunurnar. Menningin kring okkum gongur ikki tann vegin.

Skipanin hjá okkum við eini fyri okkara land felags og óheftari brunatrygdarumsiting er borgarum og kommunum ein trygg, skynsom, góð og óheft skipan.

Føroyski leisturin hevur tikið skap eftir atlitum, so sum, at allar føroyskar kommunur eru smáar, eisini tær stóru, at kommunur í sambandi við lógarásett virksemi og t.d. stovnsbygging ofta er umsøkjari, málsviðgeri, loyvisgevi, eftirlit, byggiharri, fíggjarábyrgdari og eigari alt í einum.

Landsstýrið hevur fyri trygdar-, eftirlits- og gegnisligar sakir lagt serliga sokallaða Bruna-byggimáls- og eftirlitsvirksemið á óheft stað burtur frá kommunum og eisini burtur frá øðrum byggiliga virknum landsstovnum og umsitingum. Hildið verður tí fast við hesa skipan.

Til § 36
Greinin kemur í staðin fyri § 25 í brunalógini.

Greinin gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta reglur fyri
- nýtslu av eldi og ljósi
- goymslu, flutning og nýtslu av ymiskum evnum og fyri innrætting og rakstri av virkjum, har slík evni verða goymd ella framleidd
- innrætting og nýtslu av eldstøðum og øðrum útbúnað til hita, ljós og kraft
- og at gera slíkar ásetingar fyri mannaverk, so sum bygningar, tilhaldsstøð, serlig løgu- og byggiarbeiði, tangar bingjur, kranar, tunlar, áskoðarapallar og – øki, v.m., sum verða hildnar neyðugar til at byrgja fyri eldvanda og til tryggingar av fullgóðum rakstri viðvíkjandi fráboðanar- og sløkkiútgerð, og rýmingar-, bjargingar- og sløkkingarmøguleikum, um eldur kemur í.

Greinin gevur landsstýrismanninum breiða heimild til at áseta reglur, sum skulu byrgja fyri eldvanda og til tryggingar av fullgóðum rakstri viðvíkjandi fráboðanar- og sløkkiútgerð, rýmingar-, bjargingar- og sløkkingarmøguleikum, um eldur kemur í.

Greinin fevnir bæði um vanligar bygningar, mannaverk í heila tikið, um bygningar til tilhald, ymisk virksemi, sum er ella kann vera vandamikið virksemi, og goymslur, tangar, uppløg úti, umpakking, nýtsla, tilvirking o.a., og flutningur í sambandi við eitrandi, spreingifim evni ella annað tilfar, tað veri seg av føstum, flótandi ella loftbornum tilfari.

Landsstýrismaðurin við tilbúgvingar- og brunamálum kann lata gera reglur fyri og seta krøv um staðseting, fráleikar, innrætting, byggiligar sundurskilingar, byggitilfar, sløkki- og ávaringarskipanir, bjargingar- og rýmingarviðurskifti, til- og frákoyringar, trygdar- og sløkkiútgerð, tilbúgvingar- og rakstrarviðurskifti, umframt at seta krøv um førleika til handfaring av virkseminum, goymslum, flutningi o.a.

Tær kunngerðir, sum eru gjørdar við heimild í § 25 í verandi brunalóg eru kunngerð um eldfiman løg og kunngerð um brunaverju og brunatrygd.

Tær reglur, sum landsstýrismaðurin ger í sambandi við serlig viðurskifti eru sokallaðar tekniskar serfyriskipanir, sum eru eitt nú herðandi ásetingar fyri gassgoymslu, flutningi og nýtslu í hesum

sambandi. Tekniskar serfyriskipanir kunnu gerast sum stakreglur fyri m.a. goymslubygning, goymslu, flutning og handfaring av t.d. bensini, plastevnum, pulvurevnum, timburgoymslu, samkomuhøli, fýrverk, eldfiman løg, gass, fyribils samkomutiltøk í tjaldi, ásetingar fyri stevnutiltøk á landi og bátastevnu við bryggju o.a.

Viðmerkjast skal, at § 23 í brunalógini, sum viðvíkur skorsteinsreinsan, ikki er tikin við í hetta lógaruppskotið.
Greinin gav landsstýrismanninum heimild at áseta reglur um, hvussu ofta skorsteinar og roykræsir skuldu verða reinsað, hvussu hetta skuldi verða gjørt, hvør ið hetta skuldi gera og um gjøld fyri hetta. Staðfest var eisini, at gjaldið kundi innheintast við panting.

Ongar reglur eru gjørdar við heimild í § 23 í brunalógini. Verður mett neyðugt í framtíðini at gera reglur um at reinsa skorsteinar og roykræsur, so verður mett, at heimild er í § 36, stk. 1. Sambært § 36, stk. 1 er heimild til at gera reglur, sum vera mettar neyðugar fyri at byrgja fyri eldvanda, og kunnu reglur um reinsan av skorsteinum tí gerast við heimild í § 35, stk. 1, um tað skuldi verið neyðugt.

Stk. 2 er nýggj, og gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta reglur um
- dygdarkrøv til byggitilfar
- at góðkenna sløkkiútgerð, sløkki- og ávaringarskipanir
- reglur fyri útgerð, uppseting, viðlíkahaldi og fyri innleggjarar viðv. sløkki- ávaringar- , eldforðingarskipanum, gassupphitingarútbúnaði o.a.

Økt teknisk útgerð til "óvanliga" bygging, stórir bygningar og høli, tjøld til fólkasamkomu, tunlar til fólkaferðslu v.m. treytar, at reglur eru fyri dygd av tilfari, fyri at tryggja, at hesi hava eitt ávíst minsta dygdarmark í mun til brunatrygdaratlit.

Tí verður mælt til at gera greiðar reglur og heimildir fyri at seta slík dygdarkrøv.

Tilkallingar- og fráboðanarskipanir krevja neyvt rakstrarhald, góðan førleika at handfara og dygdargóða og trygga staðseting. Tørvur er eisini á at leggja tílíkt í karmar í serfyriskipanum, sum krevja skipanirnar at vera álítandi. Hetta eru reglur og tekniskar ásetingar, sum liggja uttan fyri vanligu kunngerðina um brunaverju og brunatrygd.

Innleggjarar viðv. sløkki-, ávaringar-, eldforðingarskipanum, gassupphitingarútbúnaði o.a. kunnu taka allýst serskeið um installering av m.a. eldávaringarmiðstøðum við signalflyting til vaktarstøð. Her er talan um fólk, sum taka serskeið í uppseting av eldávaringartólum.

Í dag hava summir innleggjarar førleika at seta upp eldávaringartól, og ynskja teir skrivað og skipað viðurskifti á hesum øki.

Í stk. 3 fær landsstýrismaðurin heimild til at kunngera reglur og fyriskipanir við bert at vísa til heiti, nummar og dagfesting fyri, nær reglurnar ella fyriskipanirnar eru undirritaðar av skikkaðum myndugleikum. Júst sama orðing er í dag í brunalógini § 25, stk.2. Við hesum kunnu eitt nú serligar danskar ella ES fyriskipanir verða settar beinleiðis í gildi fyri Føroyar, uttan at skula lýsa alla fyriskipanina.

Stk. 4 er nýtt og staðfestir, at kommunur við kunngerð kunnu fáa heimild til at taka avgerð eftir teimum reglum, sum verða gjørdar við heimild í hesi grein. Kommunur taka í dag avgerð eftir kunngerð um brunatrygd og brunaverju, og er talan tí ikki um eina nýggja skipan.

Ætlanin er framhaldandi, at kommunur skulu viðgera tey mál, har tað eru skrivaðar reglur. Soleiðis, at tað er Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, sum framhaldandi skal viðgera mál, sum víkja frá skrivaðu reglunum. Tey mál, sum krevja serligt tekniskt innlit, har krøv skulu setast ítøkiligt út frá brunatrygdarligum prinsippum, og ikki frá skrivaðum reglum, skulu sostatt framhaldandi viðgerast av Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, sum hevur fakligan førleika á høgum støði, umframt at hava neyðugu venjingina.

Til § 37
Greinin kemur í staðin fyri § 21 í brunalógini. Smávegis broytingar eru gjørdar í orðingini.

Greinin ásetur, at vandamikið virksemi ikki kann setast á stovn uttan loyvi frá Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal eisini geva loyvi til umbyggingar, umvælingar, økingar, niðurtøku ella broytingar í rakstrinum.

Virksemi, sum kemur undir hesa grein er virksemi, har tað verða framleidd, viðgjørd, handfarin, goymd ella nýtt spreingifimir, eldfimir ella eldførir løgir, luftevni ella onnur vandaevni. Hetta virksemið er t.d. Kryoanlegg, olju- og bensintangar, aðrar tílíkar goymslur, rørskipanir, gassgoymsla, bensinstøðir, virksemi í sambandi við at tilevna og handfara spreingievni, fýrverk o.a., timburhandlar, mjøl- og fóðurgoymslur í høll ella tanga, handlar við gassi ella sveisiútgerð (ilt og gass), trýstfløskur við gassevni ella blandaðum gassevnum, sum eru spreingifimir, eldfør ella spreingi og eldsbrunaelvandi o.a.
Verandi orðing í brunalógini § 21 "til at seta á stovn virki" hevur ikki víst seg at vera nóg greið. Virki er broytt til "virksemi", fyri at nágreina, at talan ikki bert er um at seta á stovn nýtt virki, men eisini, tá eitt virki byrjar nýtt virksemi.

Dentur skal leggjast á, at talan ikki bert er um virksemi, sum fer fram í bygningum, men eisini virksemi, sum fer fram á støðum, so sum á havnarøkjum ella goymsluplássum v.m. Sum dømi kann nevnast fýrverk, sum ofta verður handlað og umskipað á støðum og ikki í bygningum.

Orðingin "framleidd, viðgjørd ella nýtt" er víðkað til "framleidd, viðgjørd, handfarin, goymd ella nýtt".

Goymslur í bingjum ella bingjuvognum - trailarum- og akførum koma eisini undir hesa grein.

Tað er ikki bert fyri at stovna slíkt virksemi, at loyvi krevst. Loyvi krevst eisini til umbyggingar, umvælingar, økingar, niðurtøku ella broytingar í rakstrinum.

Orðingarnar í stk. 2 eru eisini nágreinaðar.

Stk. 2 ásetur, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann seta krøv viðvíkjandi staðseting, rakstri, flutningi, eftirliti, innrætting og nýtslu av goymslum og virksemi. Øll krøv, sum verða sett, skulu minka um vandan fyri eldsbruna ella spreinging, ella til at tryggja góðar møguleikar fyri sløkkiarbeiði og bjarging av mannalívum, um eldur er í, ella um óhapp stendst av vandamiklum evnum.

Virkini kunnu eisini verða áløgd at útvega sær ávaringar-, bruna- og bjargingar- og fyribyrgingarútgerð, umframt at vatnveiting verður løgd til egna nýtslu.
Greinin ásetur sostatt tær fortreytir og mannagongdir, sum eru fyri egintilbúgving hjá fyritøkum viðvíkjandi brunaviðurskiftum. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins er myndugleikin, sum ásetur treytirnar fyri, hvussu egintilbúgvingin er, hvørja útgerð fyritøkurnar skulu útvega sær, og hvørji krøv til førleika, handfaring av útgerð, goymslu, flutningi o.a. skulu setast.

Í sambandi við stovnsetan ella eftirfylgjandi eftirlit kunnu ásetast tiltøk, sum tryggja, at virksemið verður rikið undir tryggum umstøðum, og at skaðahendingar kunnu handfarast á skynsaman hátt.

Nevnast kann, at § 39 áleggur stovninum at hava regluligt brunaeftirlit við virkjum, sum eru fevnd av § 37. Eftirlit við egintilbúgving fyri onnur øki enn bruna er eisini lagt til Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins sbrt. § 19, stk. 3. Eitt nú kann nevnast, at egintilbúgving, sum virki vera áløgd fyri at fyribyrgja og basa oljudálking, ofta viðvíkur virkjum, sum eru fevnd av § 37, og í teimum førum er skynsamt, at eftirlitið við virkjunum verður samskipað.

Til § 38
Greinin kemur í staðin fyri § 22 í brunalógini.

Greinin ásetur, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins fyri ávísar bygningar kann seta krøv, fyri at minka um brunavandan og til tryggingar av fullgóðum bjargingar- ella sløkkimøguleikum, um eldur kemur í.

Talan er um bygningar, har trygdarligur vandi kann verða orsakað av eldi, vandamiklum ella dálkandi evnum, ella har stór virði eru hótt av oyðing.

Staðfest verður, at ásetingar kunnu verða settar fyri samkomuhús, sjónleikarhús, gistingarhús, sjúkrahús, handilsdeplar og bygningar, ið verða nýttir til dagstovna-, undirvísingar-, framsýningar- ella skemtanarendamál og mannaverk, virksemi og goymslur við eldførum tilfari ella størri virkir og høli, har fólk koma.

Verandi orðing í greinini hevur ikki verið heilt greið, tá talan er um, hvat hon neyvt eigur at fevna um. Tí verður orðingin broytt nakað.

Tað verður nágreinað, at ásetingin fevnir um bæði nýggjar og verandi bygningar, at tey tiltøk, sum kunnu setast í verk, eru bæði rakstrarlig og byggilig, og at ásetingin eisini fevnir um handilsdeplar, dagstovnar og goymslur við eldførum tilfari.

Orðingin “har serligur vandi er fyri eldi” er broytt til “har serligur trygdarligur vandi kann vera orsakað av eldi” fyri at nágreina, at orðingin ikki bert vísir til bygningar v.m., har tað er serligur vandi fyri, at eldur kemur í, men har tað kann vera serligur trygdarligur vandi, um eldur skuldi komið í.

Broytta orðingin er ætlað at vísa til, at atlit skulu takast at trygd brúkaranna og at tryggja serligar bygningar og serlig virði v.m. Greinin fevnir um verandi og nýtt virksemi, bygningar o.a.

Í sambandi við verandi- og nýbyggingar og tilknýtt virksemi, skal metast um og tryggjast, áðrenn byggiloyvi verður givið, at brunatrygdarlig og fólkatrygdarlig atlit eru hildin, og áðrenn bygging ella mannaverk verða tikin í nýtslu, skal fáast góðkenning ella sokallað nýtsluváttan.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins setir í dag krøv fyri m.a. óvanligar, stórar, opnar bygningar ella serligar nýtsluflokkar, so sum óvanligar skúlar, deplar til fjøltáttaða nýtslu, handilshús, størri áskoðarapláss, tjaldingarpláss, bátastevnur, timburhandlar, plastvirkir og mjøl- og fóðurvirkir, stórar vørugoymslur o.a., sum ikki verða gjørd eftir almennu krøvunum um brunatrygd (fyri tíðina kunngerð um brunaverju og brunatrygd, vanliga kallað KBB 99).

Umframt kendar nýtslur og bygningsflokkingar o.a., eru serligar byggingar og nýtslur, m.a. varðhaldshús, serlig sjúkrahús, mannaverk, so sum tangar til bensin og tungolju o.a., ymisk gass og tunlar, soleiðis háttað, at tey ikki rúmast undir vanligum reglum, og mugu tí koma heilt ella lutvíst undir hesa grein og eina meting í sambandi við málsviðgerð sambært hesi grein.

Nýggju og broyttu orðingarnar í stk. 1 og 2 eru fyri, at greinin greitt vísir á, at talan er um brunatrygdarlig atlit sum heild. Hetta er frammanundan umrøtt í viðmerkingunum til § 22 í verandi brunalóg. Nú verða orðingar sum "ný- og verandi bygningum" beinleiðis nevndar í greinini.

Møguleiki verður at gera reglur fyri útitiltøkum, so sum samkomu við fólkafjøld úti ella í serligum tjøldum, festivalar, tjaldingarlegur, bátastevnur og tílík tiltøk, sum vanliga verða roknað sum afturvendandi- ella fyribils virksemi.

Stk. 2. ásetur, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann áseta, at brunavaktarhald skal vera í sambandi við ávísa nýtslu, ella tá serligar framførslur eru innan- ella uttandura. Tað eru altíð sløkkiliðsfólk, sum hava brunavaktarhald, og tá Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins ásetur brunavaktarhald, verður eisini ásett, hvørjum vaktarhald serliga skal haldast við í sambandi við ítøkiliga tiltakið.

Størri inni- og útitiltøk kunnu vera so umfatandi, at ráðiligt er, m.a. fyri at hava yvirlit yvir tiltakinum, at tilevnað verður ein "trygdarætlan", sum vísir, hvørji trygdaratlit í minsta lagi skulu vera fyrireikað og kend, eins og at tilskilað verður, hvør hevur ábyrgd av tiltakinum.

Vanliga gevur løgreglan loyvi til tiltakið, og leitar hon sær fakliga vegleiðing til tess at tryggja, at tiltøk verða hildin undir forsvarligum umstøðum.

Ein tilbúgvingarætlan ella "rakstrarætlan" fyri einum tiltaki skal vera brúkarunum ein tryggleiki, loyvisveitaranum ein viðgerðarstuðul, og tiltakshavandi at halda seg til.

Til § 39
Greinin kemur í staðin fyri § 24 í brunalógini. Greinin viðvíkur brunasýning.

Brunaumsjón landsins sýnar í dag serligar bygningar, rakstur, virksemi o.a., sum er fevnt av §§ 21 og 22 í verandi brunalóg, §§ 37 og 38 í uppskotinum.

Skotið verður upp at broyta skipanina soleiðis, at lógarásetta regluliga sýnið frameftir bert skal fevna um bygningar v.m., sum eru fevndir av § 37, (núverandi brunalóg § 21). Hesir bygningar eru eldhættisligir bygningar, goymslur, virksemi v.m. Sí § 37 og viðmerkingarnar til hesa grein.

Fyri bygningar, mannaverk, v.m., fevnt av § 38 í uppskotinum, er skotið upp, at landsstýrismaðurin við kunngerð skal gera av í hvønn mun Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal sýna hesar bygningar. Hetta verður staðfest í stk. 2.

Tá kunngerð verður gjørd og avgerast skal í hvønn mun bygningar skulu sýnast, eigur atlit at takast at m.a. stødd á bygningum og tal av brúkarum.

Nøkur dømi kunnu nevnast um bygningar o.a., sum sýnskylda eigur at verða sett fyri:

1. bygningar, goymslur, virkir, høli og støð við virksemi í sambandi við

a. sjúkra- og heilsurøkt til fleiri enn 5 fólk (m.a. óhjálpin fólk), undirvísing til fleiri enn 10 fólk, gistingar til fleiri enn 10 fólk, dagstovnar, barnagarðar o.a. til fleiri enn 10 fólk,
b. samkomuhald inni og úti til fleiri enn 50 fólk, skrivstovuvirksemi til fleiri enn 50 fólk,
c. handilshøli størri enn 150 m2, bilhús størri enn 200 m2, tjaldingarpláss størri enn 200 m2,

2. stevnur, størri samkomuhald við tónleika- ella ítróttarframførslu, tjalding og tjøld til samkomuhald úti sum inni, bátastevna við fleiri enn 25 bátum í trunka,
3. oljugoymslur.

Brunasýn hava til endamáls, at krøv - sum eru galdandi ella galda fyri virksemi, bygningar, høli, goymslur, nýtslur, tiltøk o.a. - verða hildin, til tess at forða fyri, at eldur kyknar, eldur breiðir seg, at fólk og fæ kunnu koma í vanda, at eldforðingar, rýmingar- og bjargingarviðurskifti eru nøktandi, um eldsbruni skuldi tikið seg upp.

Somuleiðis er endamálið at sýna vandamikið virksemi, goymslur o.a., at skaði, dálkingarvandi o.a. kunnu fyribyrgjast, og at neyðugar viðlíkahalds- og ávaringarskipanir eru virknar og kunnu handfarast.

Tá sýnað verður, kannar Brunaumsjón landsins eisini tekniskar skipanir, sum skulu vera virknar, fyri at tað ávísa virksemið verður rikið trygt. Talan kann vera um roykvarnara- og sprinklaraskipanir og t.d. eldforðingarskipanir (sjálvvirkandi hurðaafturlatingar, roykventilasjón o.a), sum er fortreyt fyri loyvda virkseminum.

Eisini verður kannað, um óhóskandi virksemi, órudd og forðingar gera seg inn á fólkatrygdina ella trygdina sum heild.

Brunasýn skal, um gjørligt, fara fram við vegleiðing og grundgeving, til tess at vekja fatan fyri galdandi reglum og mannagongdum og endamálinum við teimum.

Tá sýnskylda verður ásett í kunngerð, so verður eisini møguligt at seta nýtslubann eftir stk. 4 í lógini, um so er, at sýningin vísir, at tað fyriliggja viðurskifti, sum kunnu elva til serligan vanda fyri brunatrygdina.

Tá Tilbúgvingar- og brunaumsjónin sýnir bygningar o.a., eigur kommunali brunaumsjónarmaðurin at vera við Brunaumsjónini, fyri at hann skal kenna sínar bygningar, sum hann skal sløkkja og bjarga í, sum eisini ásett í reglugerð fyri brunaumsjónarmenn.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal sýna við atliti at m.a. fólkatrygd, at virði ikki verða hótt, at ikki óneyðugur vandi er fyri brúkarar, viðskiftafólk, starvsfólk, virksemi, umhvørvi, o.a. verður, ella kann verða rakt av vanda, skaða ella oyðing.

Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal geva sær far um og staðfesta, hvørt galdandi ásetingar eru fylgdar, treytir fyri givnum loyvi eru hildnar og skal meta um, hvørt byggilig ella rakstrarlig viðurskifti eru vandamikil, ella umstøður kunnu gera, at tilhald, virksemi, nýtsla o.a. kann gerast ein vandi ella hóttan fyri fólk, fæ, virði ella umhvørvið v.m.

Talan kann vera um eldfimt byggitilfar, klæðingar, manglandi ella forðaðar, læstar rýmingarleiðir, óvirkin bjargingarop, óvirkin ella manglandi hald av ávarandi- , sundurskilandi ella trygdar- og bjargingarútbúnaði.

Eisini kann talan vera um at staðfesta ov stóra fólkamongd í mun til trygdarligu umstøðurnar, einhvør vandamikil nýtsla saman við samkomuhaldi, slit, rot, rust, tæring, ella onnur brek, manglandi viðlíkahald av bygningi, tangum, rørskipanum, ventilum, dálkingarforðingum (brunnar, oljuútskiljarar og ávaringarskipanir til hesi) og trygdarviðurskifti kring hetta.

Ætlanin er, at kommunurnar skulu fremja brunasýn fyri bygningar v.m., tá brunatekniska byggimálsviðgerðin er løgd til kommunurnar við heimild í § 36, stk. 4. Eisini í teimum førum kunnu kommunalu myndugleikarnir seta nýtslubann, sambært stk. 4 í hesi grein, um treytirnar fyri tí eru loknar.

Stk. 4. Ásetingin gevur eftirlitsfólkinum heimild at seta nýtslubann. Treytin fyri at seta nýtslubann er, at ”tað fyriliggja viðurskifti, sum kunnu elva til serligan vanda fyri brunatrygdina”.

Talan kann vera um serligan vanda fyri brunatrygdina m.a., tá útgonguøki mangla, neyðútgongd, sundurskiling, verja um rýmingarveg ella trappur ikki eru nøktandi, forðingar eru, ógreiðar rýmingarleiðir, ov smalar rýmingarleiðir, ella at skelti og ljós til rýmingarleiðir ikki eru nøktandi, vandamikil nýtsla, ov stórt fólkatal, óhóskandi bygningur til nýtsluna ella virksemi uttan loyvi. At høli eru óhóskandi til nýtsluna hevur eisini atlit at, at sjón- hoyri- rørslu- ella sinnisbrekað eru undir tryggum umstøðum. Talan kann eisini vera um serligan vanda fyri brunatrygdina í sambandi við kravdar brunatrygdarligar skipanir, t.d. sprinklaraskipan ella annað, sum er ein fortreyt fyri, at trygdarstøðið er hildið.
Er okkurt, sum kann elva til serligan vanda fyri brunatrygdina, skal eftirlitið krevja ábót gjørda beinanvegin á staðnum. Til dømis at lata eina hurð upp, meðan eftirlitið er til staðar.

Endamálið við greinini er, at bygningur, høli og virksemi skulu vera trygg fyri starvsfólk og brúkaran (ymsar brúkaraflokkar) at vera í, um vandastøða skuldi tikið seg upp.

Ber ikki til at gera ábøturnar á staðnum, skal virksemið, ið kann ávirkast av trygdarligum manglum, steðgast heilt ella lutvíst, um tað verður mett neyðugt.

Stk. 5. Um manglar verða staðfestir, men tað ikki verður mett neyðugt at seta nýtslubann, so skal gevast freist fyri at bøta um brekið.

Stk. 6 staðfestir, at tá nýtslubann verður sett, skulu boðini og krøvini skjótast gjørligt skrivliga boðast eigaranum ella teimum, sum beinleiðis vaða av nýtsluni.

Tað ber ikki til fyrst at geva skrivlig boð, um mett verður, at nýtslubann skal setast, eitt nú tí rýmingarleiðin í samkomuhøli ikki kann latast upp. Tá má kravið setast á staðnum, og um rýmingarleiðin ikki verður latin upp, so má nýtslubann setast. Eftirfylgjandi má skrivligt boðast eigaranum frá skjótast gjørligt.

Fráboðan skal ikki forða fyri endamálssetninginum, sum er fólkatrygdin hjá brúkarunum, viðskiftafólki, børnum o.ø. Brúkarar við ymsum førleika, ella avvarðandi, hava rætt til at rokna við, at bygningar, virksemi, tilhald, almenn tilgongd høli av ymsum slagi, og tiltøk annars, verða hildin og rikin undir umstøðum, sum lúka støðið fyri alment galdandi ella lógligar trygdarligar ásetingar.

Nýtsluforboð kunnu boðast eigara, leigara ella tílíkum, sum beinleiðis varðar av nýtsluni.

Kap. 8. Alment

Til § 40
Greinin svarar til § 13d, stk. 2 í brunalógini.

Greinin leggur upp til samstarv millum stjórnarráð, stovnar, kommunur og fyritøkur um tilbúgvingina. Samstarv kann eisini gerast við onnur, sjálvboðin sum vinnulig. Innan tilbúgving kann samstarv vanliga tilmælast sum ein góð loysn, eitt nú fyri at fullnýta tilbúgvingarorkuna, og fyri at minka um útreiðslurnar.

Sum dømi kann nevnast, at ein veitari av tilbúgvingarútgerð, -manning, -førleika ella øðrum kann gera avtalur við fleiri partar.
Roknað verður við, sum fortreyt fyri skynsamari tilbúgving, at fleiri ábyrgdarhavandi øki hava og nýta somu manning, útgerð og fíggjarsamsýningar, tilkallingarhátt, og framhaldandi eginmenning v.m.

Til § 41
Greinin svarar til § 13c, stk. 2 í brunalógini.

Greinin ásetur eina samstarvsskyldu.
Til tess at røkka eini semju um tilbúgving, og at stovnseta eina skynsama samlaða tilbúgving fyri alt landið er umráðandi, at partarnir kenna tørvin hjá hvørjum øðrum, at hóskandi yvirlit er viðvíkjandi verandi og tørvandi – komandi viðurskiftum, tí er samstarv sera týdningarmikið.

Ætlanin er ikki at brúka hesa áseting sum koyril, men heldur sum eina áminning um, at neyðugt er við samstarvi og serliga í eini byrjanar- og uppbyggingartíð.

At samskipa tilbúgvingina tvørtur um myndugleikamørk, ella onnur mørk, hevur sum fortreyt, at allir partar við tilbúgvingarskyldu eru fúsir at samstarva og at ganga undir felags leiðreglur um, hvussu tilbúgvingin fyriskipanarliga eigur at verða løgd til rættis og skipað.

Til § 42
Greinin er nýggj og gevur landsstýrismanninum heimild til at áleggja borgaranum gjald fyri ávísa málsviðgerð.

Gjald kann bert krevjast fyri málsviðgerð eftir § 37 (eldhættislig virkir), § 38 (onnur vanda virkir), fyri regluligt eftirlit eftir § 39, stk. 1 og møguligt regluligt eftirlit, sum verður ásett við heimild í § 39, stk. 2, umframt eftirlitið, sum verður framt eftir § 19, stk. 3(egintilbúgving hjá fyritøkum).

Eftir tiltakandi menning í byggivinnuni er blivið meiri vanligt, at verkætlanir o.a. leggja seg uttan fyri vanligar og skrivaðar brunatrygdarligar byggireglur. Hetta kemur vanliga undir heitið óvanlig ella nýtslugrundað bygging, har tað í stóran mun verður gingið út um skrivaðar byggireglur.

Eisini kunnu koma fyri verkætlanir, sum als ikki eru fevndar av vanligum byggireglum. Sum dømi kann nevnast høgt "útsýnistorn" við matstovu ovast, flótandi hotell, samkomuhøli og konsertsalur inni í tunli, tunlar til virkir ella samferðslu. Talan kann eisini vera um "nýskapanir" ella virksemi, sum ikki eru okkum kend í dag.

Til handfaring, kanning, viðgerð og avgreiðslu av tílíkum málum krevst drúgv arbeiðsorka, m.a. verkfrøðilig servitan, sum má takast inn móti gjaldi.

Tílík viðurskifti liggja ikki innan fyri tað, sum roknast kann við, at ein verkætlanini óviðkomandi, borgarin, umvegis vanliga almenna umsiting skal pliktast at gjalda fyri.

Til hetta kann Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins heimilast at taka gjald.

Ætlandi skal gjald bert krevjast fyri serliga málsviðgerð. Talan er um málsviðgerð, sum verður framd út um tað virksemi, sum Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins vanliga hevur. Hetta er tá serlig bygging fer fram, har málsviðgerðin verður serlig og møguliga serliga drúgv ella krevur heilt serligan fakligan førleika. Væntast kann ikki, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal hava fastsett fólk við venjing á øllum hugsandi økjum, tá tað kemur til byggimálsviðgerð. Tá serligar byggingar fara fram, kann tað tí gerast neyðugt at taka sær serliga ráðgeving í sambandi við málsviðgerðina. Fyri slíka viðgerð verður mett mest skynsamt, at prosjektið skal rinda.

Til § 43
Greinin gevur landsstýrismanninum heimild at leggja kærumyndugleikan viðvíkjandi avgerðum eftir lógini til eina kærunevnd.

Eftir setninginum um skynsamliga landsumsiting, kann landsstýrismaðurin við tilbúgvingarmálum lata kærugongdina ganga um ein hóskandi stovn.

Landsstýrismaðurin við tilbúgvingarmálum kann á henda hátt tryggja sær, at kæruviðgerð fer fram undir málinum viðkomandi og hóskandi fakligum atlitum.

Ætlanin er í fyrsta umfari at leggja kæruviðgerðina av avgerðum, sum Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins tekur eftir §§ 37 og 38, umframt kærur um eftirlit, sum verður framt við heimild í § 39 til eina kærunevnd. Eisini avgerðir, sum kommunan tekur viðvíkjandi tí brunateknisku byggimálsumsiting, sum verður løgd til kommunurnar at viðgera, skal kunna kærast til eina kærunevnd.

Sostatt er bert ætlanin, í fyrsta umfari, at flyta kærumyndugleikan viðvíkjandi brunatekniskari byggimálsviðgerð til eina kærunevnd.

Ætlandi skal hendan viðgerðin leggjast til kærunevndina í lendismálum, sum longu í dag viðgerð byggimál, og sum hevur serligan førleika.

Í nevndini sita í dag 5 limir. Formaður skal vera løgfrøðingur. Av hinum nevndarlimunum skulu 2 vera byggikønir, 1 skal vera landmátarakønur, og 1 skal vera løgfrøðingur.

Áðrenn slík kærumálsviðgerð kann fáa virknað, skulu viðurskiftini skipast við kunngerð.

Kap. 10. Revsireglur

Til § 44
Greinin svarar til § 26 í brunalógini.

Eftir stk. 1, nr. 1 kann revsast, um ein ikki er nóg varin við eldi, ljósi, eldførispinnum, øsku, eldfimum evnum og øðrum, sum annars kann elva til eld.

Eisini kann ein revsast, um ein ikki ansar eftir, at fólk, sum hoyra til húski hansara ella virki eru nóg varin.

Vísast kann á revsilógina §§ 180–182, sum viðgera eldáseting.

Eftir stk. 1, nr. 2 kann revsast, um ein nýtir útbúnað, sum kann elva til eld, hóast útbúnaðurin ikki er í fullgóðum standi. Eisini kann ein revsast fyri at lata onnur nýta slíkan útbúnað, sum ikki er í fullgóðum standi. Talan er um elútbúnað ella annar ljós-, kraft- ella maskinútbúnaður, sum kann elva til eld.

Eftir stk. 2 kann revsast, um ein ikki á fullgóða hátt heldur eldstaðir ella roykrør frá eldstøðum rein. Ábyrgdina fyri at halda hesi rein hevur tann, ið sum eigari ella brúkari nýtir tey høli, har eldstaðurin er.

Eisini kann revsast, um ein ikki heldur skorsteinar, eldstaðir ella roykleidningar í standi. Eigarin hevur ábyrgdina av at halda hesi í standi. Tann, sum er brúkari, kann eisini revsast fyri at hesi ikki verða hildin í standi, um hann ikki hevur boðað eigaranum frá ella boðað kommunalu tilbúgvingini frá skjótast, aftaná at hann er vorðin kunnugur við brekið.

Revsingin er bót.

Til § 45
Stk. 1
Greinin heimilar revsing, sum er sekt ella fongsul upp til 4 mánaðir fyri brot á:

1. § 30, sum staðfestir, at tann, sum verður varugur við eldsbruna ella umstøður, ið vísa, at hóttandi vandi er fyri eldsbruna, ella varnast við óhapp av vandamiklum evnum, skal alt fyri eitt siga teimum frá, sum eru hótt av vanda, senda boð eftir kommunalu átakstilbúgvingini og royna at byrgja fyri vandanum.

2. § 31, stk. 1, sum áleggur øllum eina skyldu at veita ta hjálp, tey kunnu, tá eldur er í.

3. § 32, stk. 2, sum ásetur, at øll hava skyldu at virða byrging í sambandi við eitt átak og at lýða boðum frá løgregluni ella átakstilbúgvingini um at fara av avbyrgda økinum ella vegum til og frá skaðastaðnum.

Stk. 2 staðfestir, at tann kann verða revsaður á sama hátt, sum ikki ger eftir **boðum** ella **forboðum**, sambært:

1. § 19, stk. 1, sum ásetur, at viðkomandi landsstýrismaður kann áleggja almennum og privatum fyritøkum og stovnum at hava neyðuga egintilbúgving.

2. § 19, stk. 2, sum ásetur, at fyritøkur, sum hava egintilbúgving, hava skyldu til, eftir umbøn, at hjálpa kommunalu tilbúgvingini og landstilbúgvingini.

3. § 20, stk. 1, sum ásetur, at um tað verður mett neyðugt at halda samfelagnum eitt neyðugt tilbúgvingarligt støði, kann viðkomandi landsstýrismaður áleggja almennum og privatum fyritøkum og stovnum at skipa fyri serstøkum tiltøkum við atliti at vørum, tænastum, framleiðslugøgnum o.a., sum er partur av vanliga virksemi teirra.

4. § 26, stk. 1, sum ásetur, at tann, ið ræðið hevur á innara skaðastaðnum kann krevja, at privat útgerð og flutningstól verða latin til nýtslu í átakinum.

5. § 31, stk. 2, sum ásetur, at tann, ið er hjástaddur, tá eldur er í, skal, tá ið tann, sum ræðið hevur á innara skaðastaðnum krevur tað, taka lut í bjargingar- og sløkkingararbeiðinum.

6. § 32, sum ásetur, at øll hava skyldu at gera eftir boðum frá átakstilbúgvingini, og at øll hava skyldu til at virða byrging í sambandi við eitt átak og at lýða boðum frá løgregluni ella átakstilbúgvingini um at fara av avbyrgda økinum ella vegum til og frá skaðastaðnum, og at øll hava skyldu til, eftir boðum um bráðflyting at fara av skaðaraktum øki ella tilhaldi og fara eftir ávístu leið til annað tilhalds- ella hýsingarøki.

7. § 33, stk. 1, sum ásetur, at øll hava skyldu til, eftir umbøn frá Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins, at hýsa bráðfluttum og í neyðugan mun at kostarhalda teimum.

8. § 34, sum ásetur, at viðkomandi landsstýrismaður kann áleggja øllum skyldu til at geva upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at leggja til rættis tilbúgvingina.

9. § 35, sum ásetur, at Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins kann frá øllum krevja upplýsingar um, hvørji tilbúgvingarlig tiltøk eru sett í verk ella ætlanir eru um at seta í verk, umframt upplýsingar, sum vera mettar neyðugar til at fremja uppgávurnar í tilbúgvingini.

10. § 37, stk. 2, sum gevur Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins heimild til at seta krøv til eldhættisligar bygningar, mannaverk o.a.

11. § 38, stk. 1, sum gevur Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins heimild til at seta krøv til serligar bygningar, har fólk samlast, og har stór virði eru hótt av oyðing v.m.

Stk. 3 ásetur, at tann kann revsast á sama hátt, sum uttan loyvi setur á stovn, umbyggir, umvælir, økir, tekur niður ella broytir raksturin av virksemi sbrt. § 37, stk. 1. Talan er her um eldhættisligt virksemi.

Verandi brunalóg gevur í dag í § 27 heimild til at revsa fyri brot á lógina. Revsingin kann tó ikki vera størri enn bót. Tað liggur tí ein herðing í revsireglunum við tað, at skotið verður upp, at brot á § 45 kann revsast við bót ella fongsul upp til 4 mánaðir.

Mett verður, at talan er um sera umráðandi skyldur, sum neyðugt er at seta strong krøv til. Tí verður mett rætt at áseta harða revsing, um skyldurnar ikki verða hildnar. Um átøk, boð og forboð ikki verða vird kann henda, at hetta førir við sær óbótaligan skaða fyri fólk, fæ, umhvørvi, virðir og ognir, og tí verður mett, at tað er rímiligt at seta harðari revsing fyri ikki at virða tær skyldur, sum borgarunum verða álagdar sambært hesum ásetingum. Mett verður ikki, at tað er órímiligt at herða revsirammuna til fongsul upp til 4 mánaðir. Viðmerkjast kann, at revsingin í donsku "beredskabsloven" er tann sama fyri tey brot, sum eru viðgjørd her.

Til § 46
Her verður heimilað at seta revsireglur í kunngerð, sum verður gjørd við heimild í § 36, stk. 1-3.

Til § 47
Her verður staðfest, at feløg, løgfrøðiligir persónar, eisini kunnu revsast.

Til § 48
Áseting um gildiskomu.

Jacob Vestergaard
lansstýrismaður

/ Rógvi Reinert